ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Í hoyring**

2. januar 2015
**Mál**: 14/00091-7
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: Hilmar Høgenni

**Løgtingsmál nr. Xx/2013: Uppskot til løgtingslóg um val til Løgtingið**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um val til Løgtingið**

**(Løgtingsvallógin)**

## I. Tinglimir

**§ 1**. Løgtingið hevur 33 limir, sum verða valdir við lutfalsvali sambært § 34. Løgtingið verður valt fyri fýra ár í senn og hevur sæti, til nývalda Løgtingið er sett.

*Stk. 2.* Tá ið løgtingslimur eftir reglunum í tingskipanini ikki kann møta á fundum ella fer frá sum limur í tinginum, kemur sum varalimur tað ikki valda valevni, sum hevur flestar persónligar atkvøður á listanum hjá viðkomandi flokki.

## II. Valrættur og valbæri

**§ 2**. Valrætt til Løgtingið hevur hvør, sum er fyltur 18 ár, hevur heimarætt í danska ríkinum og er heimahoyrandi í Føroyum, uttan so at hann er undir verjumáli og hevur mist rættarliga myndugleikan eftir § 6 í verjumálslógini.

*Stk. 2.* Persónur, sum fyribils hevur tilhald uttan fyri Føroyar í útbúgvingarørindum og undan flytingini úr Føroyum hevur verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum í minst 5 ár tilsamans, hevur valrætt, um hann annars lýkur treytirnar í stk. 1 og 3. Tó missur hesin persónur valrættin, tá hann hevur havt tilhald uttan fyri Føroyar í meira enn 8 samfeld ár.

*Stk. 3.* Fyri at kunna atkvøða skal veljarin vera á vallista.

**§ 3.** Valbærur er hvør, sum hevur valrætt til Løgtingið sambært § 2, stk. 1, uttan so at hann er revsaður fyri gerð, sum hevur við

sær, at hann eftir almannahugsan ikki er verðigur at sita á tingi.

*Stk. 2.* Tann, ið dømdur er fyri revsiverda gerð, verður ikki óverðigur til tingsess, uttan so at hann fær fongsulsdóm í 4 mánaðir ella longri, ella trygdarvarðhaldsdóm.

*Stk. 3.* Heldur ikki er hann óverðigur, tá ið 5 ár eru liðin frá tí, at revsingin er avsitin, fyrnd, ella eftirgivin ella frá endaligari leyslating úr trygdarvarðhaldi.

*Stk 4.* Persónur kann stilla upp, hóast mótmæli um valbæri, sambært § 42, stk. 2.

## III. Løgtingsvalnevndin

**§ 4.** Landsstýrismaðurin velur løgtingsvalnevnd við 3 limum og 1 tiltakslimi fyri hvønn av limunum fyri 4 ár í senn. Løgtingsvalnevndin skipar seg sjálv. Limirnir hava skyldu at taka við starvinum, uttan so at teir eru fyltir 60 ár, ella teir eftir meting landsstýrismansins hava lógligt forfall.

*Stk. 2.* Løgtingslimur ella valevni kann ikki vera limur ella tiltakslimur í løgtingsvalnevndini. Er løgtingsvalnevndin ikki fullmannað, tilnevnir landsstýrismaðurin nýggjan/r lim/ir.

**§ 5.** Formaðurin í løgtingsvalnevndini tekur sær av øllum fyrireikingunum av sjálvum valinum og tekur ímóti valevnislistunum og øðrum fráboðanum til valnevndina.

*Stk. 2.* Løgtingsvalnevndin ansar eftir, at valstýrini á teim einstøku valstøðunum hava alt klárt til atkvøðugreiðsluna.

**§ 6.** Løgtingsvalnevndin førir gerðabók, og í hana verður ført alt av týdningi, sum viðvíkir valinum. Gerðabókin verður undirskrivað av løgtingsvalnevndini, og formaðurin hevur gerðabókina í varðveitslu.. Tá formansskifti er, handar fráfarandi formaðurin eftirmanni sínum gerðabókina.

*Stk. 2.* Í seinasta lagi dagin eftir, at valið er gjørt endaliga upp, skal formaðurin í løgtingsvalnevndini senda landsstýrismanninum eina váttaða útskrift úr gerðabókini um, hvat ført er í gerðabókina um valið.

## IV. Skriva út val

**§ 7.** Tá val verður skrivað út, sendir løgmaður alt fyri eitt út kunngerð um hetta og ásetir valdagin við í minsta lagi 4 viku freist og í mesta lagi 5 viku freist, eins og løgmaður samstundis sigur løgtingsvalnevndini frá hesum. Løgtingsvalnevndin sendir skjótast gjørligt øllum valstýrum fráboðan um hetta.

*Stk. 2.* Flokkar, sum fingu umboðan við seinasta val, og sum framvegis hava umboðan, hava rætt at luttaka í løgtingsvalinum.

*Stk. 3.* Harumframt kunnu nýggir flokkar, sum lúka treytirnar í § 8, taka lut.

**§ 8.** Nýggjur flokkur, sum ynskir at taka lut í valinum, skal í seinasta lagi kl. 18.00 dagin eftir, at valið er skrivað út, boða landsstýrismanninum frá, at flokkurin er stovnaður, og at hann tekur lut í valinum.

*Stk. 2.* Við fráboðanini um nýggjan flokk skulu fylgja dagfestar og undirskrivaðar váttanir frá í minsta lagi 800 veljarum. Hesir veljarar skulu vera lýstir við navni, føðingardegi, bústaði, dagfesting og undirskrift. Váttanirnar skulu vera undirskrivaðar av avvarðandi kommunum, um at viðkomandi veljarar eru á vallista. Váttanir, sum á fráboðanardegnum eru eldri enn 1 ár, kunnu ikki góðkennast.

*Stk. 3.* Fráboðan um stovnan av nýggjum flokki er galdandi til fyrstkomandi val fer fram, tó í minsta lagi í eitt ár frá fráboðanardegnum.

**§ 9.** Landsstýrismaðurin gevur hvørjum flokki bókstavamerking, sum verður nýtt til valevnislista(r) floksins. Hvør flokkur fær um gjørligt sama bókstav, sum hann hevur nýtt til onnur val.

*Stk. 2.* Skjótast gjørligt aftaná tær í § 7 og § 8 nevndu freistir boðar landsstýrismaðurin frá, hvørjir flokkar hava rætt at taka lut í valinum, og hvørja bókstavamerking flokkarnir hava fingið.

## V. Vallistar og valkort

**§ 10**. Vallistarnir verða gjørdir, tá ið val er skrivað út. Á vallistan verða skrivað øll, sum valdagin lúka treytirnar fyri valrætti, sbr. § 2.

*Stk. 2*. Kommunan ger listar yvir veljarar, ið hava fastan bústað í kommununi. Eru fleiri valstøð í kommununi, verður listi gjørdur fyri hvørt valstaðið sær. Vallistarnir verða gjørdir við støði í skrásetingunum hjá Landsfólkayvirlitinum.

Stk. 3. Vallistarnir skulu hava teigar til raðnummar, navn, føðingardag, starv, bústað og til at seta kross við. Nøvnini verða sett í bókstavarøð eftir eftirnavni ella í raðnummarrøð.

**§ 11.** Skjótast til ber eftir at valið er skrivað út, skulu vallistarnir leggjast fram til alment eftirlit, og skulu teir liggja frammi í minsta lagi í eina viku á einum staði ella eftir umstøðunum á fleiri støðum í kommununi, sum liggja høgliga fyri.

*Stk. 2.* Beint sum vallistarnir eru gjørdir, sendir kommunan valkort til allar veljarar, sum eru á vallista í kommununi. Á valkortinum skal standa navn og bústaður veljarans og raðnummar á vallista umframt kunning um valstað, valdag og upplatingartíðir.

*Stk. 3.* Skjótast til ber eftir at valið er útskrivað sambært § 7, stk. 1, kunnger landsstýrismaðurin dag og tíð fyri valið. Samstundis kunnar hann um, at:

1. vallistar liggja frammi til alment eftirlit
2. valkort verða send út
3. kærur skulu stílast til avvarðandi kommunu um:
   a) at persónur ikki er komin á vallista
   b) at persónur av órøttum er tikin við
   c) manglandi valkort ella valkort við villu ella mangli.

**§ 12.** Persónur, sum stendur á vallista, skal, um hann meldar flyting úr kommununi, verða strikaður av vallistanum í kommununi, hann flytur úr og verða settur á vallista í kommununi, hann flytur til.

*Stk. 2.* Kommunan skal til og við valdagin rætta vallistan, um kommunan fær boð um, flyting til útlandið, deyða, mistan rættarligan myndugleika eftir § 6 í verjumálslógini, ella at persónur hevur fingið ella mist heimarætt.

*Stk. 3.* Veljarar, sum koma undir reglurnar í § 2, stk. 2, verða settir á vallista í tí kommunu, har teir seinast hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum. Áheitan um upptøku á vallistan skal sendast hesi kommunu. Áheitanin skal verða skrivað á oyðublað, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent. Avgerð um upptøku á vallistan er galdandi í 2 ár frá avgerðardegnum at rokna.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um upptøku á vallista av veljarum eftir § 2, stk. 2.

**§ 13.** Kommunan skal uttan drál viðgera kærur, sum koma inn eftir § 11, stk. 3. Vísir tað seg, at villa ella mangul eru í valkorti ella vallista, verður hetta rættað við at skriva út nýtt valkort og at rætta vallistan. Hesir feilir kunnu verða rættaðir til og við valdagin.

## VI. Valevnislistar

**§ 14.** Valið fer fram eftir listum, har ávísir persónar, sum sambært § 2, stk. 1 hava valrætt, bjóða seg fram sum valevni.

*Stk. 2* . Valevnislisti hjá flokki, sum lýkur treytirnar í § 7, stk. 2 ella er góðkendur eftir § 8, má í minsta lagi hava 25 valevni og í mesta lagi 43 valevni. Verður henda treyt ikki hildin, skal listin ógildast.

*Stk. 3.* Valevnini skulu verða skilliga lýst við navni, p-tali, starvi og bústaði. Nøvnini verða sett í bókstavarøð eftir eftirnavni. Um valevni ikki ynskir at verða sett við fullum navni á atkvøðuseðilin, skal greitt tilskilast, hvussu navnið skal setast á. Eftirnavn umframt í minsta lagi eitt fornavn ella forbókstavir hjá valevni skal altíð setast á atkvøðuseðilin. Bert eftirnavn, sum valevni hevur rætt til at nýta eftir lóggávuni, kann setast á atkvøðuseðilin. Ístaðin fyri fornavn, kann nýtast kallinavn, sum er eitt avbrigdi av fornavni.

*Stk. 4.* Valevnislistarnir mugu vera formanninum í løgtingsvalnevndini í hendi í seinasta lagi kl. 18.00, 2 vikur undan valinum.

*Stk. 5.* Valevnislisti hjá flokki, sum lýkur treytirnar í § 7, stk. 2 ella er góðkendur eftir § 8, skal verða undirskrivaður av valevnunum. Aðrir listar skulu vera undirskrivaðir av í minsta lagi 400 og í mesta lagi 450 veljarum sum stillarar. Hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir skilliga eru lýstir við navni, føðingardegi, bústaði, dagfesting og undirskrift. Valevnini og stillararnir kunnu eisini undirskriva á avrit av valevnislistanum. Eisini kunnu valevnini í staðin fyri við undirskrift, vátta uppstilling sína við brævi, telduposti o.tíl. Listin skal vera latin inn av einum umboði fyri flokkin ella einum av stillarunum, og hesin hevur rætt til á einum avriti av valevnislistanum at fáa kvittan frá formanninum fyri, at listin er móttikin og nær.

*Stk. 6.* Ongin má stilla upp sum valevni hjá meira enn einum flokki ella stilla upp uttanflokka og samstundis vera valevni hjá einum flokki. Ger nakar ímóti hesum, verður valið, um tað fellur á hann, ógildigt.

*Stk. 7.* Ongin kann vera stillari fyri meira enn ein valevnislista. Hann, ið er stillari fyri fleiri listar, kann ikki roknast sum stillari hjá nøkrum lista.

*Stk. 8.* Um valevnislisti verður lýstur ógildigur, ella um valevni verður strikað av listanum, skal henda avgerð løgtingsvalnevndarinnar, sum er endalig, verða skrivað í valbókina, og úrskrift úr henni verða send tí umboði fyri flokkin ella tí stillara, sum hevur latið listan inn, skjótast møguligt og í øllum førum fyri valið.

*Stk. 9.* Heldur nevndin, at rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildigan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi umboði fyri flokkin ella viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at rætta brekið.

**§ 15**. Stillar sami flokkur fleiri listar upp, setir valnevndin eitt tal aftrat bókstavmerkingini. (A1, A2, A3 o.s.fr.).

*Stk. 2.* Valevnislistar, sum ikki eru frá flokki sum lýkur treytirnar í § 7, stk. 2 ella er góðkendur eftir § 8, verða roknaðir sum uttanflokkalistar.

## VII. Atkvøðuseðlar

**§ 16.** Løgtingsvalnevndin útvegar atkvøðuseðlar til valið og sendir neyðugt tal av teimum til hvørt valstað. Atkvøðuseðlarnir skulu verða gjørdir soleiðis, at ikki sæst ígjøgnum teir, og at teir kunnu faldast, so óviðkomandi ikki sær, hvussu atkvøtt er.

*Stk. 2.* Atkvøðuseðilin skal hava upplýsing um valdag og valár, bókstav- og floksfrámerkir (vallisti X, vallisti Y o.s.fr.) í so nógvum reglum sum talið á valevnislistum og harumframt hava nøvnini á øllum valevnum í somu raðfylgju og við somu nummarmerking, sum tey eru lýst í valevnislistanum. Aftaná flokslistarnar verða settir møguligir uttanflokkalistar við heitinum “uttanflokkalisti” (1, 2, 3 o.s.fr.).

*Stk. 3.* Valevnislistarnir skulu vera skildir hvør frá øðrum við grovari striku, og nøvnini á valevnunum skulu vera skild hvørt frá øðrum við tunnari striku.

*Stk. 4.* Onki annað orð, bókstavur, tal ella frámerki má vera á nøkrum atkvøðuseðli, hvørki við prenti, skrift ella á annan hátt.

## VIII. Valstøð, valstýri, valhøli o.a..

**§ 17.** Valið fer fram á teimum valstøðum, sum eru lýst í fylgiskjali til hesa lóg. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð broyta valstøðini. Onki valstað kann hava færri enn 100 veljarar.

**§ 18.** Eitt valstýrið, sum er sett av kommunustýrinum, skipar fyri atkvøðugreiðsluni á hvørjum valstaði sær. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir hvør kommuna skal velja. Valstýrið hevur 3 limir og skipar seg sjálvt. Løgtingslimur ella valevni kann ikki

vera limur ella tiltakslimur í valstýrinum. Valstýrið førir gerðabók.

**§ 19.** Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum kommunan hevur skyldu at ávísa. Atkvøðuklivar í neyðugum tali skulu vera tøkir. Atkvøðuklivarnir skulu vera soleiðis háttaðir, at ongin uttanífrá sær, hvussu atkvøtt verður. Klivarnir skulu hava ta útgerð, sum er neyðug fyri at atkvøða.

*Stk. 2.* Í valhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistarnar verða sligin upp. Somuleiðis skal verða sligin upp vegleiðing frá landsstýrismanninum um sjálvt valið.

*Stk. 3.* Kommunan útvegar ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu kunna læsast og annars vera soleiðis háttaðir, at ongin atkvøðuseðil kann verða tikin uppúr, uttan at kassin verður latin upp. Atkvøðukassarnir skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram.

## IX. Atkvøðugreiðsla á valdegnum.

**§ 20.** Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00, ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

*Stk. 2.* Valið byrjar við, at formaðurin í valstýrinum vísir fram atkvøðukassarnar, soleiðis at tað sæst, at teir eru tómir, og síðani verða teir læstir, til atkvøðugreiðslan er liðug.

*Stk. 3.* Tá steðgur kemur í, verður valið lýst at vera liðugt, tó soleiðis at limirnir í valstýrinum og hjálparfólk tess tá beinanvegin hava rætt at atkvøða.

**§ 21.** Veljarar, ið vilja taka lut í valinum valdagin, mugu møta persónliga at velja.

*Stk. 2.* Veljarin skal hava við sær valkortið, sum hann handar valstýrislimi ella hjálparfólki. Hevur veljarin ikki valkortið við, verður nýtt valkort skrivað. Tá staðfest er, at veljarin er tann, hann gevur seg út fyri at vera, og at hann stendur á vallistanum, verður merki sett við hann á vallistanum. Valkortið verður síðani lagt saman við valkortum, sum longu eru latin inn, í somu raðfylgju, sum veljararnir verða avgreiddir. Síðan verður atkvøðuseðil handaður veljaranum.

*Stk. 3.* Er veljari, sum møtir á valstaðnum, longu merktur á vallista, tí hann hevur brævatkvøtt sbrt. § 29, stk. 1, verður brævatkvøða hansara tikin frá teimum brævatkvøðum, sum verða roknaðar uppí, sbrt. § 29, stk. 3, og løgd til brævatkvøður, sum ikki verða roknaðar uppí, sbrt. § 29, stk. 2.

*Stk. 4.* Tá veljarin hevur fingið atkvøðuseðilin, fer hann beinanvegin inn í atkvøðuklivan, har ongin annar má vera inni, sí tó § 22. Her fer atkvøðugreiðslan fram á tann hátt, at veljarin setur kross antin við ein lista ella við eitt av valevnunum.

*Stk. 5.* Áðrenn atkvøðuseðilin verður koyrdur í atkvøðukassan, kann veljarin, móti at lata atkvøðuseðilin inn, fáa umbýtt atkvøðuseðilin við ein nýggjan, um hann er komin at seta krossin á skeivt stað, ella seðilin av óansni ella misgáum er gjørdur ónýtiligur. Tann ónýtiligi seðilin verður ógildaður.

*Stk. 6.* Veljarin leggur nú atkvøðuseðilin soleiðis saman, at ongin annar sær, hvussu atkvøtt er, og koyrir hann beinanvegin í atkvøðukassan, meðan ein úr valstýrinum ella eitt hjálparfólk tess sær.

**§ 22.** Í teim førum, sum nevnd eru niðanfyri, kann valstýrið slaka í teimum fyrisettu reglunum fyri atkvøðugreiðslu:

1. Møtir persónur á val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, fær hann hjálp til hetta frá tveimum hjálparfólkum, sum valstýrið hevur tilnevnt til hetta endamál. Veljarin kann tó krevja, at annað av hjálparfólkunum er persónur, hann sjálvur vísir á. Hjálparfólkini hava tagnarskyldu.
2. Um persónur vegna brek ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir ásetingunum í nummar 1.

## X. Atkvøðugreiðsla við brævi

**§ 23.** Veljari kann, í staðin fyri at møta persónliga á valstaðnum valdagin, sbrt. § 21, stk. 1 atkvøða við at senda inn brævatkvøðu sambært reglunum í §§ 24-28.

**§ 24.** Veljari kann greiða atkvøðu á fólkayvirliti í eini og hvørjari kommunu. Sjófólk kann eisini atkvøða hjá mynstringarmyndugleikanum. Veljari, sum ynskir at greiða brævatkvøðu, skal vísa valkort ella nøktandi samleikaprógv.

*Stk. 2.* Fólk, sum eru sjúk ella óhjálpin heima kunnu atkvøða heima. Tvey hjálparfólk, sum valstýrið tilnevnir, og sum bæði skulu hava við sær samleikaprógv og tilnevningina, skulu verða hjástødd. Veljarin kann tó krevja, at annað hjálparfólki er persónur, hann sjálvur vísir á.

*Stk. 3.* Veljari, ið er innlagdur á sjúkrahús e.tíl. kann greiða atkvøðu á staðnum sbrt. stk. 2.

*Stk. 4.* Veljari, ið situr í fongsli ella varðhaldi, kann greiða atkvøðu hjá løgregluni.

*Stk. 5.* Veljari, ið staddur er í Danmark ella Grønlandi, kann greiða atkvøðu á støðum, sum har verða nýtt til brævatkvøðugreiðslu.

*Stk. 6.* Veljari, ið staddur er uttanríkis, kann greiða atkvøðu á føroyskum og donskum sendistovum ella konsulátum í útheiminum ella hjá einum, sum landsstýrismaðurin hevur heimilað.

*Stk. 7.* Sjófólk kann greiða atkvøðu hjá skiparanum á skipinum, tað er mynstrað á.

*Stk. 8.* Veljari, sum býr á útoyggj, sum ikki hevur sjálvstøðugt valstað, kann brævatkvøða á oynni. Tvey hjálparfólk, sum valstýrið tilnevnir, og sum bæði skulu hava við sær samleikaprógv og tilnevningina, skulu verða hjástødd.

**§ 25.** Sjófólk og onnur, sum ikki halda seg fara at vera heima valdagin, og veljarar, sum staddir eru uttanlands, kunnu atkvøða í fyrsta lagi dagin eftir, at valið er útskrivað. Í øllum øðrum førum kann í fyrsta lagi verða atkvøtt 1 viku áðrenn valdagin.

*Stk. 2.* Atkvøðugreiðsla við brævi kann í seinasta lagi fara fram dagin fyri valdagin, og atkvøðuseðilin skal vera komin fram til valstaðið, áðrenn atkvøðugreiðslan endar.

**§ 26.** Til atkvøðugreiðslu við brævi útvegar landsstýrismaðurin neyðugar atkvøðuseðlar við tilhoyrandi brævbjálvum og oyðubløðum umframt størri brævbjálvar, sum tilfarið skal sendast í, til kommununa.

*Stk. 2* Atkvøðuseðlarnir skulu hava orðið "atkvøðuseðil" prentað á aðrari síðuni. Brævbjálvin skal hava slíka tjúkd, at ikki sæst ígjøgnum hann. Á forsíðuni á størra brævbjálvanum skal vera prentað, at hann inniheldur ein atkvøðuseðil til løgtingsval, og á baksíðuna skal vera prentaður teigur, har veljarin setur navn sítt og bústað í kommununi, har hann stendur á vallista.

**§ 27.** Atkvøðugreiðslan er bert gildig, um hon fer fram við nýtslu av atkvøðuseðlum, brævbjálvum og oyðubløðum, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað. Atkvøðugreiðslan fer fram á tann hátt, at veljarin vendir sær til ein av teimum í § 24 tilskilaðu hjálparfólkunum. Hjálparfólkini hava ábyrgd av, at veljarin ikki verður órógvaður ella ávirkaður av valstríði ella øðrum í sambandi við brævatkvøðugreiðsluna. Aftaná at hava víst samleikaprógv, fær veljarin atkvøðuseðil útflýggjaðan saman við oyðublaði, brævbjálva og størri brævbjálva. Hann atkvøður síðani beinanvegin, uttan at nakar er hjástaddur, antin við at skriva navnið á einum valevni, sum er uppstillað, møguliga við tilskilan av flokki, ella navnið ella bókstavamerkingina hjá einum flokki. Síðan leggur hann, uttan at nakar annar sær, hvussu hann hevur atkvøtt, atkvøðuseðilin í tilhoyrandi brævbjálva og límar hann aftur.

*Stk. 2.* Veljarin útfyllir og undirskrivar síðani tað í § 26, stk. 1 nevnda oyðublað. Undirskrift veljarans á oyðublaðið fer fram, meðan hjálparfólkini sbrt. § 24 eru hjástødd. Síðani verður oyðublaðið váttað av hjálparfólkunum. Eru tvey hjálparfólk til staðar við brævatkvøðugreiðsluna, krevst váttan frá báðum hjálparfólkunum.

**§ 28.** Tá ið veljarin hevur atkvøtt, og oyðublaðið er rætt útfylt og undirskrivað, leggur hann brævbjálvan við atkvøðuseðlinum og oyðublaðnum í tann

størra brævbjálvan, sum hann letur aftur. Síðani útfyllir hann týðiliga framsíðuna og baksíðuni á størra brævbjálvanum. Brævbjálvin verður síðani handaður tí, sum atkvøtt er hjá. Hesin skipar fyri, at brævbjálvin beinanvegin verður sendur avvarðandi kommunu. Kommunan letur brævbjálvarnar óopnaðar til valstýrið fyri tí valstaði, har veljarin eftir uppgivna bústaðnum á brævbjálvanum hevur atkvøðurætt. Atkvøðugreiðslan má fara fram í so góðari tíð, at brævbjálvin er komin valstýrinum í hendi, áðrenn atkvøðugreiðslan endar.

*Stk. 2.* Um veljari ikki er førur fyri einsamallur at greiða brævatkvøðu á fyriskrivaðan hátt ella annars ynskir hjálp í samband við brævatkvøðugreiðsluna, kann hann fáa hjálp til hetta frá teimum í § 24 nevndu hjálparfólkunum. Umframt hjálparfólkið, ella í teimum førum har tvey hjálparfólk skulu verða til staðar, kann veljarin krevja, at annað hjálparfólkið er persónur, hann sjálvur vísir á. Hjálparfólkini hava tagnarskyldu.

*Stk. 3.* Tey í § 24 nevndu hjálparfólk hava skyldu at ansa eftir, at útflýggjaðir atkvøðuseðlar o.a. beinanvegin verða nýttir og flýggjaðir inn aftur samsvarandi § 27 og § 28. Tann, ið misrøkir hetta, verður revsaður eftir § 40.

**§ 29.** Áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar, verða móttiknu brævbjálvarnir opnaðir av valstýrinum, sum kannar, um tann brævbjálvin er frá tí, sum stendur á vallistanum. Um so er, verður beinanvegin settur krossur við navn veljarans á vallistanum, samstundis sum hann verður avmerktur á atkvøðulistanum, sbrt. § 21, stk. 2. Eru fleiri brævbjálvar frá sama veljara, verður bara brævbjálvin við seinast dagfesta oyðublaði roknaður uppí.

*Stk. 2.* Vísir kanningin, at viðkomandi ikki hevur valrætt, ella tað verður upplýst, at hann áðrenn valdagin er deyður, verður tann óopnaði brævbjálvin við tilhoyrandi oyðublaði lagdur aftur í tann størra brævbjálvan, og atkvøðan verður ikki roknað uppí. Sama er galdandi, um størri brævbjálvin inniheldur annað ella meira enn eitt oyðublað og ein brævbjálva, ella tað eftir útsjóndini á størra brævbjálvanum, oyðiblaðnum ella brævbjálvanum er orsøk til at halda, at tey ikki hoyra til tað tilfar, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað, ella tað ikki, hvat viðvíkur útfylling, váttan, undirskrift ella innsending er farið fram sum fyriskrivað.

*Stk. 3.* Teir brævbjálvar, sum verða at rokna uppí, verða goymdir saman við tilhoyrandi oyðublaði og størra brævbjálvanum, til atkvøðugreiðslan er endað. Brævbjálvarnir verða síðan koyrdir í ein atkvøðukassa og blandaðir millum hinar atkvøðuseðlarnar og verða ikki opnaðir, fyrr enn uppteljingin ger hetta neyðugt. Eru fleiri brævatkvøður, skulu allar í sama atkvøðukassa.

*Stk. 4.* Brævatkvøður, sum valstýrið fær aftaná, at atkvøðugreiðslan er byrjað, men áðrenn hon er endað, verða viðgjørdar á sama hátt, sum ásett er í stk. 2 og 3.

*Stk. 5.* Til ta í § 33 tilskilaðu uppgerð av valinum skulu bæði brævbjálvar, fylgiskriv og atkvøðuseðlar finnast.

**§ 30.** Ein brævatkvøða er ógildig:

1. um tað ikki við vissu kann gerast av hvørjum valevni ella flokki, veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
2. um ein brævbjálvi inniheldur annað ella meira enn ein atkvøðuseðil,
3. um tað eftir útsjóndini á atkvøðuseðlinum er orsøk til at halda, at hann ikki er ein av teimum, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað, ella at ikki er farið fram, sum fyriskrivað í lógini undir útfyllingini av seðlinum.

## XI. Atkvøðuteljingin

**§ 31.** So skjótt sum atkvøðugreiðslan er av, verða atkvøðuseðlarnir taldir á valstaðnum. Atkvøðuteljingin er almenn.

*Stk. 2.* Atkvøðuseðlarnir verða koyrdir úr atkvøðukassunum og verða síðani blandaðir og býttir javnt millum neyðugt tal av teljingarbólkum, sum eru mannaðir við valstýrislimum og hjálparfólkum. Er ivi um

gildi av einum atkvøðuseðli, ella um hvørjum valevnislista atkvøtt er fyri, verður atkvøðuseðilin ikki taldur við í fyrsta umfari, men verður lagdur til viks fyribils. Formaðurin í valstýrinum tekur ikki sjálvur lut í hesum parti av teljingini, men skal ansa eftir, at teljingin fer fram á rættan hátt.

*Stk. 3.* Tá teir einstøku teljingarbólkarnir eru lidnir við teljingina av atkvøðuseðlunum, verður úrslitið saman við teim ivasomu atkvøðuseðlunum latið formanninum.

*Stk. 4.* Valstýrið tekur síðan avgerð, um teir ivasomu atkvøðuseðlarnir skulu roknast sum gildigir ella ikki. Ein atkvøðuseðil er ógildigur:

1. um tað ikki við vissu sæst, hvønn valevnislista veljarin hevur viljað atkvøtt fyri,
2. um atkvøðuseðilin er øðrvísi vorðin enn teir, sum eru útflýggjaðir til atkvøðugreiðsluna,
3. um annað er skrivað á atkvøðuseðilin enn ein krossur, ella um atkvøðuseðlinum er givið slíkt eyðkenni, at tað sæst, hvør veljarin er.

*Stk. 5.* Verður atkvøðuseðil vrakaður, skal orsøkin verða førd í valbókina.

**§ 32.** Valstýrið ger síðan upp úrslitið av atkvøðugreiðsluni.

*Stk. 2.* Úrslitið verður ført í valbókina, og fráboðan verður send landsstýrismanninum skjótast til ber á tann hátt, sum fráboðað er undan valinum. Úrslitið skal eisini kunngerast teim hjástøddu.

*Stk. 3.* Formaðurin í valstýrinum sendir skjótast gjørligt formanninum fyri løgtingsvalnevndini allar vallistar, atkvøðuseðlar og útskrift úr valbókini í innsiglaðum pakka.

## XII. Uppgerð av valinum

**§ 33.** Løgtingsvalnevndin ger valið endaliga upp í seinasta lagi vikudagin aftaná valið.

*Stk. 2.* Løgtingsvalnevndin ger nýggja teljing og metir, eftir reglunum í § 31, givnu atkvøðuseðlarnar á hvørjum einstøkum valstaði.

*Stk. 3.* Síðan ger løgtingsvalnevndin upp fyri hvørt valstað sær, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Uppgerðin verður gjørd fyri hvønn flokk sær eftir hesum reglum:

1. Persónligar atkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri navninum á einum valevni og annars ikki givið seðlinum nakað eyðkenni, verður atkvøðan roknað sum givin fyri hesum valevni.
2. Listaatkvøður: Hevur veljarin sett kross út fyri floksnavninum ella út fyri nøvnunum á fleiri valevnum ella sett kross yvir allan floksteigin, ella sett krossin á slíkan hátt, at tað ikki við vissu sæst, hvørt av valevnum floksins veljarin hevur atkvøtt fyri, verður atkvøðan at rokna sum listaatkvøða.

*Stk. 4.* Løgtingsvalnevndin ger síðan endaligu uppgerðina yvir úrslitið av atkvøðugreiðsluni. Úrslitið verður ført í valbókina og kunngjørt fyri teimum hjástøddu.

**§ 34.** Uppgjørt verður, hvussu nógvar atkvøður, hvør góðkendur listi hevur fingið tilsamans. Samlaða atkvøðutalið hjá øllum listum, sum hava fingið í minsta lagi 1/33 part av atkvøðunum, verður býtt við tingmannatalinum (33). Við hesum tali verða atkvøðutølini hjá flokkunum býtt, og við hesum roknihátti verður funnið, hvussu nógv umboð hvør flokkur hevur rætt til at fáa í mun til atkvøðutalið. Geva teir við býti framkomnu býtingarpartar tilsamans, tá ið brøkarnir verða tveittir burtur, ikki 33 tingumboð, verða teir størstu brøkirnir hækkaðir, til hetta tal er rokkið (hátturin við størsta brøki). Stendur á jøvnum, verður kastað lut.

*Stk. 2.* Á hvørjum lista verða fólk vald eftir persónliga atkvøðutalinum. Stendur á jøvnum, verður kastað lut.

*Stk. 3.* Løgtingsvalnevndin gevur teimum eftir stk. 2 valdu valbræv.

*Stk. 4.* Løgtingsvalnevndin sendir

landsstýrismanninum atkvøðutilfarið og váttaða útskrift av valbókini. Atkvøðutilfarið verður goymt av landsstýrismanninum, til kærufreistin er farin, ella møgulig klaga um valið er endaliga viðgjørd, og støða tikin til hana. Síðani skal atkvøðutilfarið forkomast.

## XIII. Vanligar reglur

**§ 35.** Valstýrið skal síggja til, at veljararnir ikki verða órógvaðir ella ávirkaðir av valstríði ella øðrum í valhølinum ella beint við valhølið. Øll, sum eru í valhølinum, skulu gera eftir boðum frá valstýrinum.

**§ 36.** Tað er strangliga bannað limum í valstýrinum ella hjálparfólki tess at gera seg kunnugar við, hvussu veljari hevur atkvøtt.
*Stk. 2.* Eingin limur í løgtingsvalnevndini, valstýrinum, hjálparfólk ella nakar annar, ið er hjástaddur í valhølinum, har atkvøðugreiðslan fer fram, hevur loyvi at geva veljarum ráð, ávísing ella tilelving um, hvønn teir skulu velja. Heldur ikki má nakar av teimum nakrantíð upplýsa, um ein veljari hevur verið á vali, ella geva sína vitan víðari, um hann á valstaðnum fær kunnleika um, hvat valevni ella hvønn flokk ein veljari hevur valt.
*Stk. 3.* Brot á tær í stk. 2 nevndu fyriskipanir verða revsaðar við bót.

**§ 37**. Tað er bannað floksskrivstovum ella øðrum miðvíst at kanna eftir, um veljarar møta fram til atkvøðugreiðslu. Brot á hesa reglu verður revsað við bót.

**§ 38**. Eingin veljari, sum hevur atkvøtt, hevur skyldu at upplýsa fyri rættinum, hvussu hann hevur atkvøtt.

**§ 39**. Eingin má av arbeiðsgevara vera so mikið bundin, at hann ikki fær høvi til at velja.

**§ 40**. Tann, ið ikki røkir tær skyldur, sum henda lóg fyriskrivar, verður revsaður við bót, um so er, at strangari revsing ikki er uppiborin eftir lóggávuni annars.

**§ 41**. Kommunan rindar útreiðslurnar, sum standast av vali og føring av vallistum.
*Stk. 2.* Landskassin veitir løgtingsvalnevndarlimum, valstýrislimum og hjálparfólki samsýning eftir reglum, ásettum av landsstýrismanninum.

**§ 42.** Klagur um løgtingsvalið skulu vera umsiting Løgtingsins í hendi innan kl. 10.00 tíggjunda yrkadagin eftir valdagin.
*Stk. 2.* Løgtingið ger av gildi av vali tinglimanna, og um tinglimur hevur mist valbæri sítt.

**§ 43.** Henda lóg kemur í gildi ..... Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 við seinni broytingum.

# Kap. 1. Almennar viðmerkingar

## Inngangur

Ynski hevur í eina tíð verið um at dagføra løgtings- og kommunuvallógirnar. Talan er um løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið og løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til føroyskar kommunur.

Ein av høvuðsorsøkunum til, at vallógirnar skulu dagførast er, at mett verður, at minsta talið á veljarum á einum valstaði, ikki tryggjar veljarunum loyniligt val á smáu valstøðunum. Umframt hetta eru galdandi løgtingsvallóg og kommunuvallóg sera ymiskar, hetta serliga bygnaðarliga. Av tí at lógirnar hava so ymiskan bygnað, eru tær sera tungar at umsita. Við hesum lógaruppskotunum verður meiri samsvar millum hesar báðar lógirnar, sum merkir at tær verða lættari at skilja og umsita. Samstundis verða fleiri av ásetingunum í lógunum dagførdar og tillagaðar - bæði málsliga, innihaldsliga og tøkniliga.

## Galdandi rættur

Galdandi lóg um val til Løgtingið er løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið. Áðrenn hendan lóg kom í gildi var lóg nr. 124 frá 28. mars 1923 um val til Føroya Løgting galdandi. Hendan lógin hevði fyrimynd í tágaldandi fólkatingsvallóg. Við tíðini gjørdist tágaldandi løgtingsval torfør at umsita hjá øllum teimum, sum hava við løgtingsval at gera. Í 1978 kom so ein nýggj løgtingsvallóg, sum enn er galdandi.

Galdandi løgtingsvallóg regulerar, hvussu farast skal fram frá tí val til Løgtingið skal skrivast út til eitt nýtt Løgting tekur sæti. Í hesum sambandi eru fleiri tíðarfreistir, sum skulu haldast eins og allar tær uppgávur sum hoyra til eitt val, verða við vallógini býtt út á ymiskar myndugleikar.

Niðanfyri er ein nærri útgreinan av heimildum, uppgávum og skyldum hjá ymisku partunum.

*Veljarar:*
Galdandi lóg ásetur treytir fyri hvør hevur valrætt og kann verða settur á vallista. Møguleiki er hjá veljarum, sum vegna útbúgvning fyribils hava tilhald uttanfyri Føroyar, at varðveita sín valrætt. Veljarin skal í hesum føri heita á, ta kommunu, har hann seinast var skrásettur í fólkayvirlitinum, um upptøku á vallista.

Til sjálva atkvøðugreiðsluna, skal veljarin hava valkortið við sær. Um so er, at veljarin av eini ella aðrari orsøk kortini ikki hevur valkortið við sær ber til á aðrar mátar við vissu at finna útav, um veljarin er tann hann sigur seg verða, og ber tá til at útvega nýtt valkort.

Serligt atlit verður tikið til sjófólk, sjúk og onnur, ið ikki hava møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum á sjálvum valdegnum. Hesi kunnu greiða atkvøðu við brævi. Um ein veljari brævatkvøður, skal veljarin vátta, at hann valdagin ikki ella bert við stórum tvørleika kann møta á valstaðnum innan fyri atkvøðugreiðsluna ásettu tíðarfreistir.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

*Valevni:*
Galdandi lóg ásetir treytir fyri hvør er valbærur til Løgtingið. Val til Løgtingið er ikki ein borgarlig umboðan, og tí er ásett ein treyt um, at valevni skulu undirskriva valevnislistan. Valevnislistar verða lætnir inn til formannin í løgtingsvalnevndini av einum umboði fyri flokkin.

*Kommunur/kommunustýri:*
Kommunan hevur skyldu til at gera vallistar og at leggja teir til alment eftirlit. Kommunan sendir valkort til veljarar, sum eru førdir á vallista í kommununi.

Tær kærur, sum koma eftir § 6 í løgtingsvallógini verða viðgjørdar av kommununi, sum eisini ger neyðugu rættingarnar.

Tað er skyldan hjá kommuni at ávísa hølir til atkvøðugreiðsluna og útvega neyðugt tal av atkvøðukøssum og atkvøðurúmum. Kommunustýri setur valstýri og lóggildar gerðabók hjá valstýrinum.

Í sambandi við brævatkvøðu, savnar kommunan innkomnu brævbjálvarnar og innførir neyðugar upplýsingar í eina bók, ið er útvegað til hetta endamál síðani sendir hon brævbjálvarnar til valstýrið.

Umframt hetta rindar kommunan tær útreiðslur, sum standast av vali og føring av vallistum.

*Løgtingsvalnevnd:*
Løgtingsvalnevndin boðar valstýrum frá um skrivað er út nýval. Formaðurin í løgtingsvalnevndini tekur sær av fyrireikingunum av sjálvum valinum og tekur ímóti valevnislistum og øðrum fráboðanum til valnevndina. Um so er, at sami flokkur stillar fleiri listar upp, setir løgtingsvalnevndin eitt tal aftrat bókstavamerkinum, sum flokkurin hevur fingið frá løgmanninum. Um valevnislistar eru ófullfíggjaðir, skal nevndin boða viðkomandi umboði fyri flokkin ella viðkomandi stillara frá hesum. Eisini ansar løgtingsvalnevndin eftir, at valstýrini á teimum einstøku valstøðunum hava alt greitt til atkvøðugreiðsluna. Hon skal m.a. tryggja sær, at vallistarnir eru tøkir til nýtslu undir atkvøðugreiðsluni. Nevndin útvegar atkvøðuseðlar og sendir teir til valstýri.

Eftir atkvøðuteljingina á sjálvum valdegnum ger nevndin eina nýggja teljing og meting av atkvøðuseðlunum. Eisini ger valnevndin upp, hvussu nógvar persónligar atkvøður hvørt valevni hevur fingið. Nevndin ger sostatt endaligu uppgerðina av valinum, førir úrslitið í valbókina og kunnger hetta fyri teim hjástøddu.

Tá úrslitið er klárt, gevur løgtingsvalnevndin teimum valdu valbræv og sendir landsstýrismanninum atkvøðutilfarið og váttaða útskrift av valbókini.

Løgtingsnevndin førir gerðabók og undirskrivar hesa. Formaðurin í nevndini goymir gerðabókina. Eisini sendir hann landsstýrismanninum eina váttaða útskrift úr gerðabókini um, hvat ført er í gerðabókina um valið.

*Valstýri:*

Valstýrið, sum førir gerðabók, skipar atkvøðugreiðslu á hvørjum valstaði. Á valdegnum byrjar atkvøðugreiðslan við, at formaðurin lesur nøvnini upp á valevnunum og vísir fram atkvøðukassarnar. Valstýrið skal vissa sær um, at veljarin er tann, sum hann sigur seg vera, avmerkja veljaran í vallistanum og útflýggja atkvøðuseðilin. Í vissum førum hevur valstýrið heimild til at slaka í fyrisettu reglunum fyri atkvøðugreiðslu. Talan er í hesum føri um at blind og sjónveik kunnu fáa hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á. Eisini kann valstýrið loyva, at atkvøðugreiðsla fer fram uttan fyri valhølini, um ein veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhøli.

Valstýrið skal síggja til, at veljararnir ikki verða órógvaðir ella ávirkaðir av valagitatión ella øðrum í valhølinum. Meðan valstýrið samansetur teljingarbólkar, skal formaðurin fyri valstýrinum ansa eftir, at atkvøðuteljingin fer fram á rættan og tryggan hátt, og tekur ímóti teljingarúrslitinum og ivasomum atkvøðuseðlum. Valstýrið tekur síðani avgerð um ivasomu atkvøðuseðlarnir.

Í sambandi við brævatkvøður, opnar valstýrið brævatkvøðurnar og kannar um persónurin, ið brævbjálvin er frá, stendur á vallistanum.

Harumframt ger valstýrið upp úrslitið av atkvøðugreiðsluni, sum verður ført í valbókina eins og fráboðan verður send landsstýrismanninum. Úrslitið skal eisini kunngerast teimum hjástøddu. Síðani sendir formaðurin í valstýrinum formanninum fyri løgtingsvalnevndini allar vallistar, atkvøðuseðlar og útskrift úr valbókini.

*Løgtingslimir/løgtingsformaður:*
Eftir galdandi lóg hevur løgtingið 33 limir, sum verða valdir við lutfalsvali og verða hesir valdir fyri 4 ár í senn og hava sætið til nývalda Løgtingið er sett. Um so er, at løgtingslimur ikki kann møta á fundum ella fer frá sum limur í tinginum, kann varalimur møta í staðin.

Løgtingið ella løgmaður skrivar út nýval. Løgtingsformaðurin boðar landsstýrismanninum frá, hvørjir flokkar við seinasta løgtingsval fingu umboðan á tingi og framvegis eru umboðaðir har. Umframt hetta verða spurningar um vælbæri viðgjørdir av løgtinginum.

*Landsstýrismaður:*
Landsstýrismaðurin kunnger dag og tíð fyri valið og kunnar um, at vallistar liggja frammi til alment eftirlit, at valkort verða send út og at kærur viðvíkjandi vallistum og valkorti kunnu stílast til avvarðandi kommunur.

Í sambandi við valrætt hjá persónum, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar, ásetur landsstýrismaðurin reglur um upptøku á vallista, og er hetta gjørt við kunngerð nr. 137 frá 23. september 1992 um upptøku á vallista av persónum, ið hava valrætt, hóast teir ikki hava tilhald í Føroyum. Eisini útvegar hann atkvøðutilfar til kommununar í sambandi við brævatkvøðugreiðslu.

Landsstýrismaðurin velur eina løgtingsvalnevnd við 3 limum og 1 tiltakslimi fyri hvønn av limunum. Umframt hetta tilnevnir hann nýggjar limir, um so er, at valnevndin ikki er fullmannað.

Um so er, at bygdir úr ymsum kommunum hoyra til sama valstað ger landsstýrismaðurin av, hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja í valstýri.

Landsstýrismaðurin hevur heimild til at broyta valstøð í kunngerð um valstøð. Umframt hetta goymir hann atkvøðutilfarið í eitt ár og síðani skal ta forkomast.

*Løgmaður:*
Løgmaður kann skriva út nýval. Um nýval er útskrivað, sendir hann út kunngerð um hetta og ásetir valdagin. Hann boðar valnevndini frá hesum. Eisini gevur hann hvørjum flokki eina bókstavamerking til valevnislistar floksins og boðar frá, hvørjir flokkar hava rætt til at taka lut í valinum og hvørja bókstavamerking, hvør flokkur hevur fingið til valevnislistar sínar.

*Stødd á valstaði:*
Í 2009 var minsta stødd á valstaði ásett soleiðis, at onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar. Endamálið var at tryggja øllum veljarum, at val teirra er loyniligt.

# Broytingar í mun til galdandi lóg

Eftir uppskotinum verða meginreglurnar og grundleggjandi bygnaðurin í galdandi lóggávu um val til Løgtingið varðveittar. Alment kann sigast, at nakrar av uppgávunum eru fluttar frá einum myndugleika til ein annan, uttan at hetta hevur nakrar stórar avleiðingar. Í summum førum eru viðurskiftini lýst neyvari, sum m.a. bera við sær innihaldsligar broytingar. Eisini er talan um málsligar dagføringar.

*Veljarar:*
Viðvíkjandi vallistum er tann broyting, at krav ikki longur er um at aldur verður upplýstur á vallistum. Eisini er ein nágreining í og við, at ásett er, at nøvnini verða sett í bókstavarøð eftir eftirnavni ella í raðnummarrøð.

Í sambandi við atkvøðugreiðsluna á valdegnum, er í galdandi lóg nágreinað, at veljararnir koma fram at valborðinum soleiðis, sum teir sjálvir vilja, og sum høvi gevst at atkvøða. Hetta verður mett at verða ein óneyðug orðing, og tí er hetta ikki tikið við í lógaruppskotið.

Eftir galdandi lóg, er rætturin til at brævatkvøða avmarkaður til einans at fevna um sjófólk, sjúk og onnur, ið ikki hava møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum sjálvan valdagin. Við lógaruppskotinum verður hesin rættur víðkaður til at fevna um allar veljarar uttan mun til hvør veljarin er, hvat starv hann hevur ella hvussu hann er fyri. Hetta er fyri at gera skipanina meiri lagaliga og fyri at fáa vallutøkuna til at verða so góða, sum til ber.

Við lógaruppskotinum verður staðfest, at um so er, at ein persónur hevur tørv á at fáa hjálp til at greiða atkvøðu, so *fær* hann hesa hjálp. Í galdandi lóg, er hesin rættur avmarkaður til, at um ein veljari sigur seg ikki føran fyri einsamallur at greiða atkvøðu, *kann* hann fáa hjálp til hetta. Við lógaruppskotinum fær veljarin sostatt ein veruligan rætt til at fáa ta hjálp, honum tørvar í sambandi við atkvøðugreiðslu. Umframt hetta, verður rætturin til at ein veljari sjálvur kann vísa á annað av hjálparfólkunum, víðkaður til at fevna um allar veljarar. Í dag, er hesin rættur avmarkaður til blind ella sjónveik. Hetta er eisini galdandi fyri teir veljarar, sum atkvøða við brævi.

Ein nýggj áseting er í lógaruppskotinum, ið gevur veljarum, sum búgva á útoyggj, sum ikki hevur sjálvstøðugt valstað, møguleika fyri at brævatkvøða á oynni. Endamálið við ásetingini er at gera skipanina smidligari.

Við galdandi lóg, er ásett, at brævatkvøðugreiðsla í fyrsta lagi kann fara fram 4 mánaðar áðrenn valdagin. Við lógaruppskotinum verður hetta broytt til, at brævatkvøðugreiðsla kann fara fram í fyrsta lagi dagin eftir, at valið er útskrivað.

*Valevni:*
Orðingin "í vanligum umdømi" er við lógaruppskotinum broytt til "eftir almannahugsan". Harumframt er neyvari upplýst, nær ein, sum er vælbærur, ikki verður mettur at verða óverðigur til tingsess.

Eftir galdandi lóg, má ein valevnislisti ikki hava fleiri enn tíggju fleiri valevni enn talið av løgtingslimum, ið veljast skulu. Við lógaruppskotinum er talið av valevnum á einum valevnislista fastsett til at liggja millum 25 og 43 valevni.

Á valevnislistum skulu valevni verða lýst við navni, p-tali, starvi og bústaði. Eftir galdandi lóg nýtist valevni ikki at verða lýst við fullum navni, men kann velja, at bert millumnavn ella eftirnavn umframt í minsta lagi eitt fornavn ella forbókstavur skal setast á atkvøðuseðilin. Við lógaruppskotinum skal valevni upplýsa eftirnavni. Tískil verður møguleikin fyri at velja millum eftirnavn ella millumnavn ikki til staðar longur.

*Kommunur/kommunustýri:*
Við lógaruppskotinum skal kommunan í summum førum rætta vallistan til og við valdagin. Talan er um støður, tá kommunan fær boð um flyting til útlandið, deyða, mistan rættarligan myndugleika eftir § 6 í verjumálslógini, ella persónur hevur fingið ella mist heimarætt.

Við lógaruppskotinum verður hildið fast við, at listarnir skulu liggja alment frammi, men tað er einans landsstýrismaðurin, og ikki kommunurnar, sum skulu lýsa at vallistarnir liggja frammi til alment eftirlit.

*Løgtingsvalnevnd:*
Í lógaruppskotinum ber løgtingsvalnevndin sítt fulla heiti, soleiðis, at ongin ivi er um, nær talan er um løgtingsvalnevndina.

Í galdandi lóggávu er ásett, at formaðurin í valnevndini útvegar atkvøðuseðlar til valið skjótast gjørligt aftaná at freistin fyri at lata valevnislistar inn er úti. Mett verður, at ikki er neyðugt við eini freist. Tí er hetta ikki tikið víð í lógaruppskotið. Harumframt liggur ábyrgdin fyri at útvega atkvøðuseðlar, við uppskotinum, ikki longur einans á formanninum í løgtingsvalnevndini, men á allari valnevndini.

Í galdandi lóggávu er ítøkiliga nevnt, hvørjir upplýsingar verða mettir at verða av so stórum týdningi, at teir skulu førast í gerðabók. Mett verður, at ikki er neyðugt at hetta stendur í sjálvum lógartekstinum, og hetta er tí flutt yvir í serligu viðmerkingarnar.

Ein nýggj áseting er við lógaruppskotinum, sum ásetur, at tá formansskifti er, handar fráfarandi formaðurin eftirmanni sínum gerðabókina. Hetta er fyri at tryggja mannagongdina.

Í galdandi lóg er positivt ásett, at valnevndin ikki kann havna atkvøður, av tí at hesar falla á persónar, hvørs valbæri er ivasamt, men skulu tílíkir spuriningar um neyðugt avgerast av løgtinginum. Mett verður ikki at hetta er neyðugt at hava ásett í lógini, tí at í § 42, stk. 2 í lógaruppskotinum er ásett, at Løgtingið ger av gildið av vali tinglimanna, og um tinglimur hevur mist vælbæri sítt.

*Valstýri:*
Limatalið í einum valstýri, kann eftir galdandi lóg, liggja millum 3-5 limir. Við lógaruppskotinum verður fastsett at 3 limir eru í einum valstýri. Umframt hetta skal kommunustýrið ikki longur lóggilda gerðabókina, sum valstýri førir.

Mett verður ikki, at neyðugt er, at nøvnini á valevnislistunum verða lisin upp áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar. Tí er hetta ikki tikið við í lógaruppskotið. Valið skal tískil byrja við, at formaðurin í valstýrinum vísir fram atkvøðukassarnar, soleiðis at tað sæst, at teir eru tómir.

Eftir galdandi lóg, er ein áseting, sum ásetur, at meðan vali fer fram, hava tey, ið eru hjástødd, skyldu til at lýða boðum formansins, soleiðis at valið kann fara fram siðiliga. Við lógaruppskotinum verður skyldan til at lýða boðum formansins ikki til longur, tó so at líknandi ásetingin um at øll, sum eru í valhølinum, skulu gera eftir boðum frá valstýrinum, verður varðveitt.

Í galdandi lóg verður nágreinað, at tá valstýrið ger upp úrslitið av atkvøðugreiðsluni, ger hon hetta við at leggja saman stakúrslitini frá teljingarbólkunum og afturat hesum at leggja teir av valstýrinum góðkendu ivasomu atkvøðuseðlar. Mett verður ikki, at neyðugt er at hetta stendur í lógini, og tí er hetta tikið burtur.

*Løgtingslimir*
Eingin broyting

*Løgtingsformaður*
Mett verður ikki, at neyðugt er at løgtingsformaðurin boðar frá, hvørjir flokkar við seinasta løgtingsval fingu umboðan á tingi og framvegis eru umboðaðir har. Tí er hetta ikki tikið við í uppskotið, men hinvegin verður staðfest, at flokkar, sum fingu umboðan við seinasta val, og sum framvegis hava umboðan, hava rætt at luttaka í løgtingsvalinum.

*Landsstýrismaður*
Eftir galdandi lóg, skal landsstýrismaðurin í seinasta lagi 10 dagar áðrenn valið kunngera dag og tíð fyri valið. Hetta skal við lógaruppskotinum henda skjótast til ber eftir at valið er útskrivað.

Eftir galdandi lóg, skal atkvøðutilfarið goymast í eitt ár, fyri síðani at forkomast. Hetta er við lógaruppskotinum broytt til, at atkvøðutilfarið verður goymt av landsstýrismanninum, til kærufreistin er farin, ella møgulig klaga um valið endaliga er viðgjørd, og støða tikin til hana. Eftir hetta skal atkvøðutilfarið forkomast.

Viðvíkjandi vegleiðing, sum skal verða sligin upp í valhølum, er við lógaruppskotinum nágreinað, at henda vegleiðing skal verða frá landsstýrismanninum.

*Løgmaður*
Uppgávan at geva flokkum bókstavamerking, harundir fráboðanin um hetta, er við lógaruppskotinum flutt frá løgmanni og yvir til landsstýrismannin.

*Stødd á valstaði:*
Tað er eitt grundleggjandi rættindi at velja loyniligt til løgtingsval. Talið av veljarum á einum valstaði eigur at vera so mikið høgt, at tað ikki er gjørligt út frá tí almannakunngjørda valúrslitinum at eyðmerkja, hvat hvør einstakur veljari hevur atkvøtt. Í 2009 var minsta stødd á valstaði ásett soleiðis, at onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar. Talið 10 er lágt sett, og mett verður, at verandi skipan ikki veitir trygd fyri, at einstøku veljararnir ikki kunnu kennast aftur í valúrslitinum. Endamálið at tryggja rættindi at velja loyniligt til løgtingsval er tískil ikki rokkið. Neyðugt er tí, at minsta talið av veljarum á einum valstaði verður munandi hækkað, soleiðis at tryggjast kann, at valið er loyniligt.

Fyri at tryggja at valið er loyniligt, má talið av veljarum á hvørjum valstaði hækkast, og ásetast má eitt minsta mark fyri tal av veljarum á einum valstaði. Fyri at tað ikki skal verða gjørligt at ein atkvøða skal kunna eyðmerkjast frá valúrslitinum, má hvør einstakur flokkur, sum stillar upp, hava í minsta lagi eitt ávíst tal av atkvøðum - tess fleiri atkvøður, meiri loyniligt er valið. Hetta er galdandi fyri allar flokkar, sum stilla upp, eisini tann flokk, sum fær fægstar atkvøður.

Frammanundan vali, ber ikki til at vita, hvussu nógvar persónar við valrætti fara á val. Tað er vallutøkan, sum avgerð, hvussu nógvar atkvøður verða á hvørjum valstaði, men ein nærri kanning vísir, at eitt valstað eigur í minsta lagi at hava 175-230 persónar við valrætti, soleiðis at tað á hvørjum valstaðið í minsta lagi eru 150-200 atkvøður til eitt løgtingsval. Men alt eftir, hvussu høg krøv vera sett til at kunna atkvøða loyniligt, kann minsta markið vera enn hægri. Á smærri valstøðum, hendir ofta, at flokkar fáa 1 - 2 atkvøður. Á hesum valstøðum kann bera til at rokna út, hvør hevur atkvøtt hvat, tí tað eru so fáar atkvøður. Hetta hongur ikki saman við rættinum til at kunna atkvøða loyniligt. Eftir galdandi skipan, hevur næstan helvtin av valstøðunum 100 veljarar ella færri. Hetta merkir, at á fleiri valstøðum í Føroyum er rætturin til at atkvøða loyniligt í vanda. Avleiðingar av at hesin rættur er í vanda, kann verða, at fólk ikki hætta sær at velja ella tey kenna seg noyddan til at velja ein ávísan lista ella persón.

At hækka støddina á valstaði frá 10 til 200 veljarar, verður mett at verða eitt ov ógvusligt lop, og tí er, minsta støddin á valstaði, við lógaruppskotinum, ásett til at verða 100 veljarar.

Viðmerkjast skal, at fyri ikki at taka møguleikan hjá teimum, sum búgva á útoyggj, til at kenna seg sum ein part av valinum sjálvan valdagin, er skipanin við brævatkvøðugreiðslu gjørd smidligari við lógaruppskotinum, sí nærri frágreiðing niðanfyri.

*Aðrar broytingar:*
Í sambandi við atkvøðugreiðslu á valstaðnum á valdegnum, hava valstýri ábyrgd av at veljari ikki verður órógvaður ella ávirkaður av valstríði. Í galdandi lóg hevur eingin tílík áseting verið í sambandi við brævatkvøðugreiðslu. Teir veljarar, sum atkvøða við brævi, eiga eisini at kunna atkvøða uttan at verða órógvaðir ella ávirkaðir av valstríði. Tí verður við

lógaruppskotinum álagt teimum hjálparfólkum, sum er til staðar við brævatkvøðugreiðslu, at ansa eftir, at veljari ikki verður órógvaður ella ávirkaður av valstríði.

Í galdandi løgtingsvallóg er nágreiniliga lýst, hvat tað er, sum veljarin váttar, í sambandi við at hann brævatkvøður. Hesir upplýsingar standa á oyðublaðnum, og tí er hetta ikki neyðugt at hava við í sjálvari lógini, men er flutt til serligu viðmerkingarnar.

Í § 40 í galdandi lóg, er ásett, at brævatkvøðugreiðsla má fara fram í so góðari tíð, at brævbjálvin er komin valstýrinum í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan byrjar. Henda áseting er tikin burtur. Tó so er ein líknandi áseting í § 41 í galdandi lóg, sum sigur, at brævbjálvarnir skulu verða valstýrinum í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan *byrjar*. Hetta verður við lógaruppskotinum broytt soleiðis, at brævbjálvin skal verða valstýrinum í henda, áðrenn atkvøðugreiðslan *endar*. Endamálið er at gera skipanina smidligari. Hetta merkir eisini, at tær brævatkvøður, sum eru valstýrinum í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan endar, verða taldar við í uppgerðini av valinum. Við hesum fáa veljarar á útoyggj møguleika fyri at skipa fyri eini brævatkvøðugreiðslu á sjálvum valdegnum, og á henda hátt fáa "valrúsin" við, tó so at atkvøðugreiðslan er væl styttri enn á sjálvum valstøðunum, soleiðis at brævatkvøðurnar kunnu verða valstýrinum í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan endar. Viðmerkjast skal, at hóast tað við hesum verður opnað fyri møguleikanum at greiða brævatkvøðu á sjálvum valdegnum, skal fyrilit takast til, at hetta er sjálvandi tengt at veðrið og øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava eina ávirkan á, at brævatkvøðurnar ikki koma fram til tíðina.

Við lógaruppskotinum er nærri útgreinað, hvussu veljarar kunnu verða tryggjaðar rættin til at velja, og at teir kunnu velja loyniligt. Hetta verður m.a. gjørt við, at ásett er, at veljarar ikki mugu verða so mikið bundin av avbeiðsgevara, at hann ikki fær høvi til at velja. Umframt hetta er ásett, at tað er strangliga bannað limum í valstýrinum ella hjálparfólki tess at gera seg kunnugar við, hvussu veljari hevur atkvøtt, og at ikki bert limir í løgtingsvalnevndini, men eisini limir í valstýrum og hjálparfólk hava ikki loyvi til at geva veljarum ráð, ávísing ella tilelving um, hvønn teir skulu velja.

Viðvíkjandi revsing fyri brot á fyriskipanir í løgtingsvallógini, er ein broyting í og við, at ikki ber til at verða revsaður við hefti. Hetta er ein revsiháttur, sum ikki er til longur í revsilógini, og tí eigur hetta heldur ikki at standa í løgtingsvallógini.

Eisini kann nevnast, at við hesum lógaruppskotinum er kommunustýrið broytt til kommunan. Endamálið er, at tað ikki skal vera ivi um, at kommunala umsitingin hevur heimild til at fremja nógv av tíð, sum er álagt kommunustýrinum í galdandi lóg.

# Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Nakrar umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur, men hesar verða mettar ikki at hava nakra fíggjarliga ávirkan. Sum dømi uppá umsitingarligar avleiðingar eru eitt nú, at uppgávan at lýsa, at vallistar liggja frammi til alment eftirlit, einans liggur hjá landsstýrismanninum. Hetta førir við sær, at kommunurnar ikki longur skulu gera hesa lýsing.

Í báðum lógaruppskotunum er kommunustýrið broytt til kommunan. Endamálið við hesi broyting er, at ongin ivi skal verða um, at kommunala umsitingin hevur heimild til at fremja nógv av tí, sum er álagt kommunustýrinum í galdandi lóg.

| | Fyri landið/lands myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búsk aparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | nei | |

**Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hava ongar sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

## Kap. 3 Serligar viðmerkingar til løgtingsvallógina

**Til § 1.** Ásetingin er í samljóði við § 6 í stýrisskipanarlógini. Í § 6, stk. 2 í stýrisskipanarlógini er ásett, at løgtingsumboðini, ið hava verið, falla burtur, tá nývalda Løgtingið er sett. Talið av tinglimum er fastsett til 33 limir. Best er, um talið av tinglimum er eitt ólíka tal. Ásetingin samsvarar við stýrisskipanarlógina, har ásett er, at tingið í mesta lagi kann hava 33 limir.

*Stk. 2*: Ásett er, yvir hvussu langt tíðarskeið, Løgtingið verður valt fyri, og hvør kemur inn sum varalimur, tá løgtingslimur, eftir reglunum í tingskipanini, ikki kann møta á fundi ella fer frá sum limur í tinginum.

**Til § 2.** Her er ásett, hvør hevur valrætt til Løgtingsval. Valrættur og valbæri er við lógaruppskotinum skilt sundur í hvør sína grein. Áseting um valbæri til løgtingsval er í § 3.

*Stk. 1*: Ásetingin er í samsvari við § 3 í stýrisskipanarlógini. Persónar, sum undir verjumáli, hava mist sítt rættarliga virkisføri eftir § 6 í verjumálslógini hava ikki valrætt, meðan persónar, sum á annan hátt eru undir verjumáli eftir §§ 5 og 7 í verjumálslógini, varðveita sín valrætt.

*Stk. 2:* Endamálið við ásetingini er at geva føroyingum, sum fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar í útbúgvingarørindum, møguleika fyri at fara á val. Hendan ásetingin gevur føroyingum í útbúgving uttan fyri Føroyar einans valrætt og ikki valbæri til løgtingsval.

Reglurnar í § 29, stk. 1 í grundlógini og § 3 í stýrisskipanarlógini vera ikki mettar at verða ein forðing fyri, at man í løgtingsvallógini gevur fólki valrætt, sum fyribils hava tilhald uttanlands í útbúgving.

Ásetingin fevnir um allar útbúgvingar, bæði langar og stuttar, og eisini tær útbúgvingar, sum eru at fáa í Føroyum. Uppihald uttanlands fyri at læra mál verður eisini at meta sum útbúgving, eitt nú sum "au-pair"-genta. Uppihald uttanfyri Føroyar aftaná lokna útbúgving til tess at læra fremmand viðurskifti at kenna, kann ikki roknast sum tilhald uttanlands í lestrarørindum.

Talan er her um ein víðkaðan rætt. Leggjast skal til merkis, at hesin víðkaði rættur avmarkast í § 2, stk. 2, 2. pkt. Orsøkin til, at ein avmarkan er til valrættin hjá føroyingum, sum eru uttanlands í lestrarørindum er, at tær longstu útbúgvingarnar í mesta lagi vara 8 ár. Annars má metast, at tá ein hevur verið so leingi burtur frá Føroyum, kann ikki sigast, at viðkomandi hevur neyðuga tilknýtið til Føroyar fyri framhaldandi at hava valrætt til løgtingið.

Kravið um bústað í Føroyum í 5 ár ella meira, nýtist ikki at hava verið samanhangandi ella beint frammanundan, at ein fer uttanlands í útbúgving.

Fyri at koma á vallista og harvið fáa rætt at velja, er neyðugt, at ein er tilmeldaður fólkayvirlitið í Føroyum, sbr. § 10, stk. 2, 3. pkt.

**Til § 3.** Her er ásett, hvør er valbærur til Løgtingið. Valrættur og valbæri er nú skilt sundur í hvør sína grein. Áseting um valrætt til løgtingsval er í § 2.

Orðingin í stk. 1-3 í ásetanini er tikin úr stýrisskipanarlógini.

*Stk. 4:* Ásetanin skal greitt staðfesta, at valbæri ikki verður roynt fyrr enn eftir valið.

**Til § 4.** *Stk. 1*: Sum útgangsstøði hava limirnir, sum valdir verða í valnevndina, skyldu til at taka við starvinum. Vísandi til § 35, stk. 2 í stýrisskipanarlógini, kann løgtingið ikki velja limir í nevndir, stýri ella ráð, ið hava heimild at taka endaligar fyrisitingarligar avgerðir.

*Stk. 2*: Endamálið er at forða fyri ógegni og harvið tryggja, at veljarin hevur álit á, at alt fer rætt fram.

**Til § 5.** Her er ásett, hvør í løgtingsvalnevndini tekur sær av hvørjum viðvíkjandi tí praktiska í sambandi við løgtingsval.

**Til § 6.** Krav er um, at ein gerðabók skal førast. Soleiðis verður alt skrásett, sum er av týdningi viðvíkjandi valinum. Tað, sum serliga verður hugsað um, eru upplýsingar um móttiknar vallistar, talið av útvegaðum atkvøðuseðlum til valið, talið av greiddum gildigum og ógildugum atkvøðuseðlum, talið av atkvøðum til hvønn flokk, sum hevur stillað upp til valið, talið av atkvøðum til hvørt av hesum valevnum, til hvørt av uttanflokkavalevnum, og

hvat løgtingsvalnevndin avgerð er úrslitið av valinum. Gerðabókin kann førast á teldu, men skal skrivast út og undirskrivast í endaligum líki.

**Til § 7.** *stk. 1:* Freistin hjá løgmanni at áseta valdagin er í minsta lagi við 4 vikur freist og í mesta lagi 5 viku freist. Í dag ber til at fyrireika val við stuttari freist, tí við teimum samskiftismøguleikum, sum eru tøkir í dag, kann veljarin verða kunnaður og annars fylgja við í øllum, sum fer fram í sambandi við val, hvar enn hann er staddur. Mett verður kortini ikki at tað er ráðiligt um freistin til at áseta valdagin er styttri enn 4 vikur, tí hetta kann raka føroyingar, ið eru burtur í arbeiðsørindum – ikki minst sjómenn við langfaraskipum. Hesir kunnu ikki kenna seg vísar í, at atkvøðurnar røkka fram til valdagin, serstakliga ikki um løgmaður velur at skriva út val nærindis páska- ella jólahøgtíðini. Við eini styttri freist vera møguliga stjórnarflokkarnir, og í øllum førum flokkurin hjá løgmanni, í eini favorablari støðu, tí hesin hevur møguleika at vita betur enn onnur, nær val verur útskrivað. Tí er freistin fyri at áseta valdagin í minsta lagi 4 vikur og í mesta lagi 5 vikur.

*Stk. 2:* Við hesi áseting hava flokkar rætt til at luttaka í løgtingsvali, um teir fingu umboðan við seinasta val og framvegis hava umboðan í tinginum, sí tó § 8.

**Til § 8.** Í sambandi við, hvussu leingi fráboðan um stovnan av nýggjum flokki er galdandi, skal nevnast, at um næstkomandi val verður áðrenn eitt ár frá fráboðanardegnum, kann fráboðaður flokkur framvegis luttaka í valinum.

*Stk. 1*: Henda regla er ikki galdandi fyri flokkar, ið longu eru góðkendir. Viðmerkjast kann, at møguleikin hjá fólkatingslimum at boða frá nýggjum flokki var avtikin í 1965, og nú er altíð neyðugt við innsavnan av undirskriftum, sbr. stk. 2.

*Stk. 3*: Fráboðan av nýggjum flokki er galdandi til fyrstkomandi val, men um val aftur fer fram innan eitt ár frá fráboðanardegnum, er ikki neyðugt at savna undirskriftir inn av nýggjum.

**Til § 9.** Fyri at gera tað léttari fyri veljaran, skal hvør flokkur um *gjørligt*, hava sama bókstav, sum hann hevur nýtt til onnur val. Ongar nærri ásetingar eru um, nær tað *ikki* er gjørligt, at flokkur fær sama bókstav. Ein flokkur er tí ikki tryggjaður ein ávísan bókstav. Løgtingið hevur heldur ikki endaliga staðfest, hvørji atlit verða løgd til grund fyri eini noktan at geva einum flokki ávísan bókstav.

**Til § 10.** Henda áseting inniheldur mannagongdir og krøv til vallistarnar.

**Til § 11.** Ein tíðarfreist er fastsett fyri, nær landsstýrismaðurin skal lýsa, at vallistarnir liggja frammi til alment eftirlit. Tað, at vallistarnir skulu liggja frammi til alment eftirlit, gevur veljarum møguleika at kanna, um upplýsingarnir hjá viðkomandi veljara, eru rættir ella um onkur villa er íkomin, eitt nú, at viðkomandi ikki er komin á vallista. Vallistarnir skulu gerast so skjótt til ber eftir at val er skrivað út.

**Til § 12.** Kommunan ger rættingar á vallistanum. Rættingar kunnu m.a. fevna um strikan av persóni á vallista, upptøka á vallista og mistan rættarligan myndugleika eftir § 6 í verjumálslógini.

*Stk. 2*: Í hesi áseting verður meiri neyvt orða, í hvørjum førum kommunan hevur skyldu at rætta vallistan, og at rætting í vallista kann gerast til og við valdagin.

*Stk. 3*: Veljarar skulu, áðrenn teir flyta úr Føroyum, upptakast á vallista í teirri kommunu, har teir seinast vóru skrásettir í fólkayvirlitinum. Hetta er, hóast ein bara hevur búð í avvarðandi kommunu í stutta tíð. Fráboðanin er galdandi í 2 ár, og um ein ynskir framhaldandi at standa á vallistanum, kann nýggj áheitan við neyðugum próvtilfari aftur sendast kommununi.

*Stk. 4*: Landsstýrismaðurin hevur heimild til at áseta nærri reglur um upptøku á vallista av veljarum eftir § 2, stk. 2. Hetta er gjørt við kunngerð nr. 137 frá 23. september 1992 um upptøku á vallista av persónum, ið hava valrætt, hóast teir ikki hava tilhald í Føroyum, sum broytt við kunngerð nr. 33 frá 24. mars 1998. Kunngerðin ásetir m.a. hvørjar upplýsingar og váttanir skulu fylgja við áheitanum, freistir fyri at senda áheitanir inn og á hvønn hátt kommunurnar skulu viðgera áheitanir.

**Til § 13.** Kommunan er kærumyndugleiki, og kærur kunnu viðgerast til og við valdagin. Umsitingin hjá kommununi kann avgreiða kærurnar vegna kommunustýrið. Umsitingin er ofta best fyri tá tað kemur til at avgreiða feilir og manglar, sum kært verður um. Við tað at kærur kunnu viðgerast valdagin, verður tryggja, at ongin veljari av órøttum verður útihýstur frá at velja, tí hann er ov seinur at kæra.

Kommunur kunnu rætta egnar feilir í skrásetingini soleiðis, at tryggjast kann, at veljari, sum hevur valrætt og valbæri, av røttum kann sleppa at velja og verða valdur. Við lógaruppskotinum er heimildin, til at gera rættingar, víðkað til eisini at fevna um tey føri, tá onkur av órøttum er komin á listan, og ikki bert tá onkur rættkomin ikki er komin á listan.

Av tí at rættingar kunnu gerast í valkortum til og við valdagin, er neyðugt, at starvsfólk, sum kunnu taka støðu til tey mótmæli, sum verða løgd fram, eru til staðar alt tíðarskeiðið valhølini er opið valdagin (t.v.s. frá kl. 10.00-20.00).

**Til § 14.** Á valevnislistunum standa ávísir persónar, sum skulu lúka treytirnar í § 2, stk. 1. Hesir persónar eru uppskotnir sum valevni. Ásetingin inniheldur fleiri krøv til valevnislistan. Løgtingsvalnevndin góðkennir valevnislistar.

*Stk. 3*: Krav er um, at valevni á valevnislistum eisini skulu lýsast við p-tali. Hetta er fyri at tryggja, at skjótt er at kanna, um valevnini lúka treytirnar fyri uppstilling, samstundis sum, at tryggja verður, at færri feilkeldur eru. Eisini skulu valevni boða frá, hvussu tey ynskja at verða sett á atkvøðuseðilin. Um eitt valevni ikki ynskir at verða sett á atkvøðuseðilin við fullum navni, so skal tilskilast, hvussu navnið skal setast á. Henda áseting er ætlað at lætta um hjá veljarum at kenna valevni aftur. Eftirnavn umframt í minsta lagi eitt fornavn ella forbókstavur hjá valevni skal tó altíð setast á atkvøðuseðilin. Bert eftirnøvn, sum valevni hevur rætt til at nýta eftir lóggávuni. Í staðin fyri fornavn, kann nýtast kallinavn, sum er avleitt av fornavni. Sum dømi kann nevnast Jákup – Jacob, Jógvan – Joen, Súsanna – Sanna, Sofía – Fía osfr.

*Stk. 5:* Valevnislistar skulu undirskrivast av valevnunum sjálvum. Valevnislistarnir verða sum oftast gjørdir í seinastu løtu, og tað hevur tí víst seg at vera trupult at fáa fatur á undirskriftum

frá valevnum, sum eru til sjós. Til ber hjá valevnum at góðkenna teirra uppstilling á annan hátt, enn við beinleiðis undirskrift á sjálvan valevnislistan, eitt nú við brævi ella telduposti.

Undirskrift verður kravd av øllum valevnum, tí løgtingsmannastarvið ikki er nakað borgarligt umboð. Krav er um, at flokslistar vera góðkendir av flokkinum, áðrenn teir verða latnir inn. Bert uttanflokkalistar skulu hava stillarar. Somu lýsingarkrøv eru fyri hesar stillarar, sum fyri veljarar, sum fráboðað nýggjan flokk.

*Stk. 9:* Eftir at freistin, fyri at lata valevnislistar inn, er farin, skal løgtingsvalnevndin kanna, um teir valevnislistar, sum eru komnir inn rættstundis, eru gildigir. Løgtingsvalnevndin skal eisini kanna, um valevnini á hvørjum valevnislista kunnu góðkennast, ella um okkurt av valevnunum skal strikast av valevnislistunum. Tað eru bert týðandi manglar, sum føra við sær, at ein valevnislisti verður lýstur ógildigur, um so er, at brekið ikki verður rættað til tíðina.

**Til § 15.** Her er ásett, hvussu farast skal fram, um sami flokkur stillar upp við fleiri listum, og hvussu valevnislistar, sum ikki lúka treytirnar í § 7, stk. 2 ella sum ikki eru góðkendir eftir § 8, verða roknaðir.

**Til § 16.** Løgtingsvalnevndin útvegar atkvøðuseðlar til valið. Atkvøðuseðlarnir skulu vera av kartong ella tjúkkum pappíri við eini vekt á minst 120 $g/m^2$. Atkvøðuseðlarnir skulu við ásettum bráki kunna leggjast saman á ein slíkan hátt, at teir kunnu leggjast niður í atkvøðukassan av veljarum, uttan at nakar hevur møguleika at síggja, hvat veljarin hevur atkvøtt.

Í løgtingsvallógini eru ongar reglur um, hvat løgtingsvalnevndin skal gera, um eitt valevni doyr beint áðrenn eitt løgtingsval. Tá løgtingsvalnevndin fær upplýsingar um deyðsfall av einum valevni, sum førir til ella vildi ført til eina broyting í atkvøðuseðlinum, og sum hevur týdning fyri atkvøðugreiðsluna hjá veljarum, skal hon tryggja sær, at atkvøðuseðilin verður broyttur ella at nýggir atkvøðuseðlar verða gjørdir, soleiðis, at farna valevni ikki verður tikið við, ella um hetta ikki er møguligt, at veljarar fáa kunnleika um deyðsfallið á annan hátt.

Hóast møguleiki er fyri, at ein veljari, sum fær kunnleika um deyðsfall av einum valevni, fer at atkvøða fyri einum øðrum valevnislista, veður ein tílík upplýsing ikki mett at verða órógv av valstríði eftir § 35. Hetta er tí, at boðini um at eitt valevni er farið, ikki í sjálvum sær er ein áheitan um at atkvøða fyri einum serligum lista. Somuleiðis er ein tílík upplýsing heldur ikki í sjálvum sær í stríð við vanligu grundregluna um lutloysi, tá sjálv fráboðanin ikki setur veljaran fyri hugburðsligari ávirkan.

Veljarar skulu upplýsast um andlátið við uppsløgum í valhølum og atkvøðuklivum. Uppsløgini skulu verða lutleys, t.d. sum ein fráboðan um, at eitt valevni NN á tí valevnislista, valevni stillar upp fyri, er deyður. Løgtingsvalnevndin ger uppsløgini, meðan kommunustýrið, skal syrgja fyri, at uppsløgini koma upp at hanga.

**Til § 17.** Tað er eitt grundleggjandi rættindi at velja loyniligt til løgtingsval. Sambært galdandi lóggávu, kann onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar. Talið av veljarum á einum valstaði eigur at vera so mikið høgt, at tað ikki er gjørligt út frá tí almannakunngjørda valúrslitinum at eyðmerkja, hvat hvør einstakur veljari hevur atkvøtt.

Fyri at tryggja at valið er loyniligt, má talið av veljarum á hvørjum valstaði hækkast, og ásetast má eitt minsta mark fyri tal av veljarum á einum valstaði. Fyri at tað ikki skal verða gjørligt at ein atkvøða skal kunna eyðmerkjast frá valúrslitinum, má hvør einstakur flokkur, sum stillar upp, hava í minsta lagi eitt ávíst tal av atkvøðum - tess fleiri atkvøður, meiri loyniligt er valið. Hetta er galdandi fyri allar flokkar, sum stilla upp, eisini tann flokk, sum fær fægstar atkvøður.

Frammanundan vali, ber ikki til at vita, hvussu nógvar persónar við valrætti fara á val. Tað er vallutøkan, sum avgerð, hvussu nógvar atkvøður verða á hvørjum valstaði, men ein nærri kanning vísir, at eitt valstað eigur í minsta lagi at hava 175-230 persónar við valrætti, soleiðis at tað á hvørjum valstaðið í minsta lagi eru 150-200 atkvøður til eitt løgtingsval. Á smærri valstøðum, hendir ofta, at flokkar fáa 1 - 2 atkvøður. Á hesum valstøðum kann bera til at rokna út, hvør hevur atkvøtt hvat, tí tað eru so fáar atkvøður. Hetta hongur ikki saman við rættinum til at kunna atkvøða loyniligt. Eftir galdandi skipan, hevur næstan helvtin av valstøðunum 100 veljarar ella færri. Hetta merkir, at á fleiri valstøðum í Føroyum er rætturin til at atkvøða loyniligt í vanda. Avleiðingar av at hesin rættur er í vanda, kann verða, at fólk ikki hætta sær at velja ella tey kenna seg noyddan til at velja ein ávísan lista ella persón.

At hækka støddina á valstaði frá 10 til 200 veljarar, verður mett at verða eitt ov ógvusligt lop, og tí er, minsta støddin á valstaði, við lógaruppskotinum, ásett til at verða 100 veljarar.

Viðmerkjast skal, at fyri ikki at taka møguleikan hjá teimum, sum búgva á útoyggj, til at kenna seg sum ein part av valinum sjálvan valdagin, er skipanin við brævatkvøðugreiðslu gjørd smidligari við lógaruppskotinum, sí nærri frágreiðing niðanfyri.

**Til § 18.** Her er ásett, at kommunustýrið setir eitt valstýri, sum skipar fyri atkvøðugreiðsluni á hvørjum valstaði sær.

**Til § 19.** Ásetingin skal tryggja, at atkvøðugreiðslan er loynilig, og at atkvøðurúmini hava neyðugu útgerðina.

Kommunan tekur sær av praktiskum fyrireikingum til atkvøðugreiðsluna á hvørjum valstaði í kommununi. Her verður serliga hugsað um, at hølir, atkvøðuklivar og atkvøðukassar skulu skaffast til atkvøðugreiðsluna, at valborð skulu setast upp og at hjálparfólk skulu verða til staðar, meðan valið fer fram. Tá avgjørt verður, hvørji høli skulu nýtast til atkvøðugreiðslu, skal kommunan hava fyrilit við, at hølini í bestan mun eru atkomulig hjá fólki, ið sita í koyristóli og onnur, ið tørva hjálp hesum viðvíkjandi.

Ongar ásetingar eru um, hvussu nógv valborð, atkvøðuklivar og atkvøðukassar skulu verða á hvørjum valstaði. Kommunan metir, út frá egnum royndum, hvussu nógv av hvørjum, tørvur er á, og hvørjum pláss er fyri í valhølinum.

Í sambandi við uppsetan av atkvøðuklivum, skal havast í huga, at ein serligur atkvøðuklivi kann verða innrættaður á ein hátt, soleiðis at pláss er fyri trimum fólkum samstundis. Orsøkin til hetta er, at nóg mikið av plássi skal verða til, at veljari kann taka tvey hjálparfólk við, tá ein veljari hevur brúk fyri hjálp til at greiða atkvøðu. Havast kann í huga, at pláss skal vera

fyri einum veljara, ið situr í koyristóli umframt tveimum hjálparfólkum í hesum serliga atkvøðukliva.

Krav er um, at vegleiðing um sjálvt valið, skal verða sligin upp í valhølunum. Vegleiðingin skal innihalda greinar í hesi lóg, sum hava størst týdning fyri sjálvt valið.

**Til § 20.** Atkvøðugreiðslan er uttan steðg. Soleiðis koma veljarar ikki til stongdar dyr. Veljarin fær tískil betri møguleika at útinna sín valrætt. Atkvøðugreiðslan er liðug, tá eingin veljari sigur seg vilja greiða atkvøðu, hóast heitt verður á tey um tað. Eingin veljari kann noktast atgongd til at greiða atkvøðu – heldur ikki eftir kl. 20.00 – um veljarin er møttur upp fyri at atkvøða, áðrenn atkvøðugreiðslan endaliga er lýst at verða liðug.

**Til § 21.** Av tí at atkvøðugreiðslan er persónlig og loynilig, er í hesi áseting krav um, at veljarar skulu møta persónliga á valstaðnum fyri at velja, um teir ynskja at taka lut í valinum valdagin. Ein veljari kann sostatt ikki biðja ein annan um at fara á val fyri seg. Hetta er eisini galdandi við brævatkvøðu á teimum støðum í kommununi, har ein og hvør veljari kann brævatkvøða. Atkvøðugreiðslan er eisini persónlig og loynilig í teimum førum, har familja ella onnur, undir hesum umboð fyri fjølmiðlar, eru til staðar meðan brævatkvøðugreiðsla fer fram. Hetta er eisini galdandi, hóast veljarin hevur ynski um, at onnur kunnu síggja, hvat veljarin hevur atkvøtt.

*Stk. 2*: Ásett er, at valkort skulu nýtast. Hóast ynskiligt er, at veljari hevur sítt valkort við á val, er hetta ikki ein treyt fyri at kunna atkvøða. Hetta er tí, at ynski er um, at valluttøka á vali, er so góð sum til ber. Eisini verður mett, at hóast veljari ikki hevur sítt valkort við á val, ber til á annan hátt at staðfesta, hvør veljarin er, og um hesin hevur valrætt á viðkomandi valstaði. Tí verður nýtt valkort skrivað, um veljarin ikki hevur valkortið við.

*Stk. 3*: Veljari, sum hevur brævatkvøtt, hevur heimild til at greiða atkvøðu valdagin, um hann ynskir tað. Her verður mannagongdin ásett fyri, hvussu farið verður fram í tilíkari støðu.

*Stk. 4:* Ásetingin er ikki ein forðing fyri, at veljarar taka barn við í atkvøðuklivan. Um veljarin setur flugubein í staðin fyri kross, verður atkvøðan góðkend at vera gildig.

**Til § 22.** Her er ásett, í hvørjum førum valstýrið kann slaka í fyrisettu reglunum fyri atkvøðugreiðslu.

*Nr. 1*: Ynski hevur ikki verið um, at serligar ásetingar um útgerð ella atkvøðuseðlar verða gjørdar. Hetta tí at vandi er fyri, at slíkar ásetingar lættliga kunnu undirgrava ásetingina um, at atkvøðugreiðslan er loynilig, tí atkvøðuseðlarnir kunnu verða eyðmerktir. Tí kunnu veljarar, sum ikki siga seg førar fyri einsamallir at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, sjálvi vísa á persón, ið tey ynskja sum hjálparfólk. Hesi hjálparfólk verða tá eisini fevnd av ásetingini um tagnarskyldu.

Veljarar, sum hava tørv á, at greitt verður frá innihaldinum á atkvøðuseðlinum og at vegleiðing verður givin um, hvussu farast skal fram í sambandi við atkvøðugreiðslu, hava rætt til at fáa hjálp til tess.

Um til ber, skulu tvey hjálparfólk veita neyðugu hjálpina, um ein veljari ynskir at fáa hjálp til at greiða atkvøðu.

Ynskir ein veljari at fáa hjálp til at greiða atkvøðu, hevur veljarin rætt til at krevja, at annað av hjálparfólkunum er persónur, hann sjálvur vísir á. Í teimum førum, har veljarin sjálvur hevur víst á eitt hjálparfólk, *skal* eitt av hjálparfólkunum á valstaðnum verða við til atkvøðugreiðsluna.

Eitt valevni, sum stillar upp til løgtingsval, kann hjálpa til sum eitt persónliga valt hjálparfólk. Hinvegin kann eitt valevni ikki hjálpa til við atkvøðugreiðslu sum tilnevnt hjálparfólk. Hetta er galdandi hóast veljarin sjálvur vísir á annað av hjálparfólkunum. Eitt valevni til løgtingsval (ella hjúnafelagi ella samlivi v.m. hjá valevni) kann sostatt ikki hjálpa til við atkvøðugreiðslu sum myndugleikapersónur.

Tað er *veljarin sjálvur*, sum yvir fyri valstýrinum ella øðrum hjálparfólki skal krevja at fáa hjálp til at greiða atkvøðu. Eingin veljari er noyddur at taka ímóti hjálp til at greiða atkvøðu.

Ynski hjá veljara um at fáa hjálp til at greiða atkvøðu av einum persóni, veljarin sjálvur vísir á, skal verða púra greitt og ikki kunna misskiljast. Tað er ikki nóg mikið, at ein annar persónur fylgir veljara yvir til eitt hjálparfólk. Veljarin skal siga við eitt hjálparfólk, ella á annan hátt gera hjálparfólkið varugt við, at veljarin ynskir at fáa hjálp til at greiða atkvøðu av einum persóni, sum veljarin sjálvur vísir á.

Ongar avmarkingar eru til *persónin*, veljarin ynskir, til at hjálpa sær at greiða atkvøðu. Persónligi hjálparin nýtist ikki at hava valrætt til sama val, sum veljarin hevur. Hjálparin nýtist heldur ikki at verða myndugur, men skal kortini hava ein slíkan aldur og vera so frætt búgvin, at viðkomandi skilir uppgávuna, einum er tillutað.

Persónur, sum veljarin vísir á at hjálpa sær við at greiða atkvøðu, er ikki bundin til at átaka sær hesa uppgávu. Harafturímóti eru uppgávurnar sum løgtingsvalnevndarlimur, valstýrislimur og tilnevnt hjálparfólk eitt borgarligt umboð. Av tí at ein persónligur hjálpari ikki er eitt borgarligt umboð, verður eingin samsýning givin frá tí almenna til ein persónligan hjálpara, hóast hesin veitir einum veljara hjálp við atkvøðugreiðslu.

At hjálp verður veitt í sameining millum myndugleikapersón og persónligan hjálpara, ber við sær, at praktiska hjálpin til sjálva atkvøðugreiðsluna verður veitt bæði av einum myndugleikapersóni og einum persónligum hjálpara. Í teimum førum, har ein praktisk uppgáva bert kann fremjast av *einum* persóni, eitt nú at seta kross á atkvøðuseðilin, má tað avtalast millum myndugleikapersónin og persónliga hjálparan, hvør av teimum fremur uppgávuna. Í teimum førum, har ósemja er, kann vanliga atliti til at atkvøðugreiðslan skal fara fram við ró og skili føra til, at ein løgtingsvalnevndarlimur verður boðsendur til at vegleiða um, hvussu atkvøðugreiðslan skal fara fram. Persónligi hjálparin skal rætta seg eftir boðum frá løgtingsvalnevndarlimi.

Persónligur hjálpari, er bundin til at veita hjálp í samsvar við vallógina. Tað er í fyrsta lagi myndugleikapersónurin, sum er til staðar við atkvøðugreiðsluna, ið skal tryggja, at vallógin verður hildin, og hendir hetta ikki, skal viðkomandi steðga atkvøðugreiðsluni og senda boð eftir einum øðrum løgtingsvalnevndarlimi. Persónligi hjálparin skal, eins og øll onnur í

valhølinum, rætta seg eftir leiðbeining frá løgtingsvalnevndarlimi, og skal fara úr valhølinum, um løgtingsvalnevndarlimurin kemur fram til ta avgerð. Hendir hetta, má neyðuga hjálpin til at greiða atkvøðu hjá veljaranum veitast av tveimum løgtingsvalnevndarlimum ella av hesum tilnevndum hjálparfólkum. Veljarin hevur eisini møguleika at vísa á ein nýggjan persónligan hjálpara ella at biðja seg undan at fáa hjálp.

**Til § 23.** Einstøku kommunustýrini taka avgerð um, innan fyri lógarinnar karmar, hvar møguligt skal verða at greiða brævatkvøðu.

**Til § 24.** Her er ásett, hvar atkvøðast kann við brævi.

*Stk. 1*: Um ivi er um, hvør veljarin er, ið ynskir at greiða brævatkvøðu, kann, um neyðugt, krevjast, at nøktandi samleikaprógv verður víst fram. Bæði hjálparfólkini skulu hava við sær samleikaprógv umframt tilnevningina, og skal eftir áheitan vísast fram. Henda áseting er einans galdandi fyri áðurnevndu tilnevndu hjálparfólk.

*Stk. 2*: Fólk, sum búgva á røktarheimi, sambýli o.l., verða at roknað sum búgvandi heima og eru tí fevnd av hesi áseting.

*Stk. 3*: Við orðingini "sjúkrahús o.l." verður m.a. hugsað um hvíldarheim, hospis og umlættingarheim, har veljari hevur fyribils uppihald vegna viðgerð.

**Til § 25.** Veljarar, sum ikki vænta seg vera heima á valdegnum, og veljarar, sum eru staddir uttanlands, kunnu atkvøða í fyrsta lagi dagin eftir, at valið er útskrivað, t.v.s. í fyrsta lagi 5 vikur áðrenn valið.

**Til § 26.** Landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av at útvega atkvøðuseðlar við tilhoyrandi tilfari í sambandi við atkvøðugreiðslu við brævi.

**Til § 27.** Atkvøðugreiðsla við brævi, kann bert verða góðtikin sum gildig, um hon fer fram við nýtslu av atkvøðuseðlum við tilhoyrandi tilfari, sum landsstýrismaðurin hevur útvegað. Veljarin skal vísa neyðugt samleikaprógv fyri hjálparfólkunum, uttan so at samleiki veljarans kann sláast fast á annan hátt. Valkort veljarans kann í høvuðsheitum brúkast sum samleikaprógv, um tað annars ikki er ivi um samleika veljarans. Um neyðugt, kunnu hjálparfólkini biðja veljaran upplýsa føðingardag sín, ella at vísa fram annað samleikakort, sum inniheldur føðingardagin hjá viðkomandi. Hjálparfólkini geva síðani veljaranum tilfarið til brævatkvøðuna, og tryggja sær, at atkvøðugreiðslan fer fram beint eftir at tilfarið til brævatkvøðuna er flýggja út.

*Stk.* 2: Tá hjástaddir eru tveir av valstýrinum til tess uppnevndir persónar, skulu báðir vátta, at farið er fram eftir galdandi reglum.

Oyðublaðið skal útfyllast og undirskrivast av veljaranum. Við undirskriftini váttar veljarin, at hann sjálvur, sjálvboðin og uttan at nakar er hjástaddur, hevur fylt út atkvøðuseðilin, stungið hann í brævbjálvan og klistrað brævbjálvan aftur. Undirskrift veljarans á oyðublaðið fer fram meðan hjálparfólkini, sbrt. § 24, eru hjástødd.

Hjálparfólkini útfylla og undirskriva oyðublaðið. Við undirskriftini váttar hjálparfólkið, at undirskrift veljarans er sonn, at staðar- og dagfestingin er bein, at atkvøðugreiðslan er farin fram, uttan at onnur hava verið hjá, og at veljarin hevur kunnað prógvað, hvør hann er. Eru tvey hjálparfólk til staðar við brævatkvøðu, krevst váttan frá báðum hjálparfólkunum.

Kommunustýrið kann taka avgerð um, at eitt av hjálparfólkum við brævatkvøðugreiðslu kann vera starvsfólk í fyristingini í kommununi. Brævatkvøðast kann ikki, um bæði hjálparfólkini eru starvsfólk í fyrisitingini í kommununi. Hetta merkir, at annað av hjálparfólkunum *skal* vera eitt av valstýrislimum ella eitt av kommunustýrinum tilnevnt hjálparfólk, sum samstundis ikki starvast í kommununi. Kommunustýrið hevur ikki skyldu til at taka eina tílíka avgerð. Kommunustýri kann taka avgerð um, at eitt hjálparfólk, sum er tilnevnt millum starvsfólk í fyrisitingini í kommununi, einans skal vera hjálparfólk við brævatkvøðu á serligum støðum, eitt nú í heiminum hjá veljaranum og ikki við brævatkvøðu aðrastaðni. Kommunustýrið kann eisini taka avgerð um, at tílík skipan, sum heild skal verða galdandi fyri brævatkvøðu nevndu støð. Tað er ikki eitt krav, at tey hjálparfólk, ið verða tilnevnd millum starvsfólk í fyrisitingini í kommununi, eru búsitandi í sjálvari kommununi.

**Til § 28.** Her er ásett, hvussu mannagongdin er, eftir at veljarin hevur atkvøtt og fylt oyðublaðið út. Hjálparfólkið, sum tekur ímóti brævatkvøðuni, hevur ábyrgdina av, at atkvøðan verður send avvarðandi kommunu. Eins og við atkvøðugreiðslu á valstaðnum valdagin, hevur veljarin rætt til at krevja hjálp við atkvøðugreiðslu. Víst verður til viðmerkingarnar til § 22 fyri nærri upplýsingum hesum viðvíkjandi.

**Til § 29.** Møguligt er hjá veljarum at brævatkvøða umaftur, um teir ynskja tað. Hetta kann serliga hugsast at vera hent hjá teimum, sum brævatkvøða, áðrenn uppstillingarfreistin er úti, sbr. § 25. Staðfest verður, at tað er tann brævatkvøðan, sum seinast er dagfest, sum er galdandi. Her er eisini ásett, hvussu farast skal fram tá móttiknu brævatkvøðurnar eru komnar á valstaðið.

**Til § 30.** Her er ásett, nær ein brævatkvøða verður mett at verða ógildig.

**Til § 31.** Her er ásett, hvussu mannagongdin er, tá atkvøðugreiðslan á valstaðnum valdagin er liðug, og hvussu atkvøðuteljingin fer fram. Eftir hesi áseting, fer uppteljing av atkvøðuseðlum fram beint eftir at atkvøðugreiðslan er av. Atkvøðuteljingin er almenn, men av trygdarávum skal tann parturin av rúminum, har uppteljingin av atkvøðunum fer fram, verða avbyrgdur á ein slíkan hátt, at óviðkomandi ikki kunnu sleppa framat atkvøðuseðlunum, men at almenningurin kortini kann fylgja við í uppteljingini av atkvøðum.

*stk. 1*: Ásetingin um at atkvøðuteljingin er almenn gevur borgarunum rætt til at vera hjástaddir, tá upptalt verður, soleiðis at veljarin sjálvur kann staðfesta, um uppteljingin fer rætt fram. Rætturin heimilar tó ikki øðrum enn teimum, sum tilnevnd eru, at handfara atkvøðuseðlarnar. Ásetingin forðar sostatt ikki fyri, at valstýrið t.d. byrgir uppteljingarborðið ella tann partin av hølinum, av við snóri ella líknandi, har uppteljingin fer fram. Víðari verður mett, at er ivi um, at persónar handfara ella ætla sær at handfara atkvøðuseðlarnar, forðar ásetingin í § 31, stk. 1 ikki fyri, at valstýrið ger tað, sum neyðugt er fyri at tryggja, at atkvøðuseðlarnir ikki verða handfarnir av øðrum enn teimum, sum skulu telja upp. Víst verður til ásetingina í § 35, 2. pkt. um, at øll, sum eru í valhølinum skulu gera eftir boðum frá

valstýrinum, eisini er við til at tryggja, at valstýrini kunnu bera so í bandi, at atkvøðuseðlarnir bert verða handfarnir av teimum sum skulu telja upp.

Viðmerkjast skal, at valevni ikki kunnu verða hjálparfólk, sí § 4, stk. 2 og § 18, og tí kunnu valevni heldur ikki luttaka í uppteljingini av atkvøðum. Starvsfólk í kommununi, kunnu verða tilnevndir hjálparar, sum skulu hjálpa til við uppteljingini av atkvøðum. Eisini kunnu starvsfólk í kommununi, sum ikki búgva í kommununi taka lut í uppteljingini. Atkvøðuteljingin skal tó fara fram undir ábyrgd, eftirliti og leiðbeining av løgtingsvalnevndini. Umframt hetta, kann atkvøðuteljingin ikki latast øðrum.

*Stk. 4, nr. 3*: Flugubein verða eisini góðkend.

**Til § 32.** Her er ásett hvussu mannagongdin er, eftir at atkvøðurnar eru taldar upp.

**Til § 33.** Her er ásett, hvussu endaliga uppgerðin av valinum fer fram

**Til § 34.** Við háttinum "størsti brøkur", verður funnið fram til, hvussu nógvar tinglimir, hvør listi fær. Við at hyggja at persónliga atkvøðutalinum á hvørjum lista, verður funnið fram til, hvørjir persónar á listunum eru valdir. Skuldi staðið á jøvnum hjá tveimum flokkum – ella annars í lutfalli fella saman, verður lutakast hildið, eins og tá ið stendur á jøvnum í persónligum atkvøðum.

*Stk. 2*: Lutakast skal eisini vera millum tey ikki valdu, hetta er fyri at avgera í hvørjari raðfylgju tiltakslimirnir eru.

**Til § 35.** Í 2002 fingu valstýrini staðiliga heimild til at skipa viðurskiftini í og beint við valhølini. Endamálið við ásetingini er at tryggja, at veljarin ikki verður órógvaður ella ávirkaður av valstríði ella øðrum í valhølinum ella beint við valhølið.

Hetta ber við sær, at propagandatilfar ikki skal býtast út, at valplakatir ikki skulu hangast upp og at veruligt valstríð ikki skal fremjast í valhølinum ella beint við valhøli, eitt nú í gongum, trappum og eftir umstøðunum skúlagørðum og líknandi. Heimildin hjá valstýrinum er tó bert ætlað til at verða nýtt í sambandi við, at t.d. valagitatión meira greidliga verður givin til kennar. Smærri merkir av ymiskum slagi, ið t.d. mæla til at velja ávísan flokk ella valevni, og sum veljari ber í sambandi við, at hann kemur at velja, eru sostatt vanliga ikki í sjálvum sær orsøk til, at valstýrið trívir inn við heimild í hesi áseting.

Forboðið er galdandi fyri alt slag av hugburðsligari ávirkan á veljaran, uttan mun til miðil, máta ella persón, haðani hugburðsliga ávirkanin kemur frá. Eisini er hugburðslig ávirkan frá øðrum veljarum fevnt av forboðnum.

Veljarakannigar á sjálvum valdegnum skulu ikki gerast í valhølunum ella beint við valhølið. Hinvegin kunnu veljarakanningar gerast uttan fyri valhøli. Krav er kortini um, at man bert kann venda sær til veljarar *eftir* at teir hava atkvøtt. Til at gera veljarakanningar á matrikulinum, har valhølið er, krevst loyvi frá kommunustýrislimunum. Harafturímóti krevst loyvi ikki frá kommunustýrinum til veljarakanningar á økjum á ella út til almennan veg. Løgtingsvalnevndin á viðkomandi valstaði, sum hevur ábyrgdina av atkvøðugreiðsluni á

valdegnum, tekur avgerð um og á hvønn hátt fjølmiðlar skulu hava atgongd til valhølini. Løgtingsvalnevndin skal tryggja sær, at fjølmiðlar ikki fáa atgongd til atkvøðuklivarnar á ein slíkan hátt, sum stríðir ímóti loyniligari atkvøðugreiðslu.

**Til § 36.** Endamálið, við ásetingini, er at forða fyri, at løgtingsvalnevndarlimir, valstýrislimir ella hjálparfólk brúka sína støðu til at gera seg kunnugan við, hvussu veljari hevur atkvøtt ella at ávirka veljarar við teirra hugburðsligu hugsanum. Heldur ikki er loyvi til at upplýsa um ein veljari hevur verið á vali. Hetta er tí, at atkvøðugreiðslan er og skal vera loynilig.

**Til § 37.** Endamálið er at gera greitt, at ikki er loyvi hjá floksskrivstovum ella øðrum at hava eftirlit við, um veljarar møta fram til atkvøðugreiðslu.

**Til § 38.** Ásetingin skal verja veljaran. Atkvøðugreiðsla til val er og verður bæði loynilig og persónlig, og ein veljari skal tí aldrin óttast fyri, at hann kann koma í eina støðu, har hann verður noyddur at upplýsa, hvussu hann hevur atkvøtt - heldur ikki fyri rættinum.

**Til § 39.** At fara á val er ein grundleggjandi menniskjarættur. Eingin arbeiðsgevari skal tí hava møguleika fyri at forða einum arbeiðsfólki at fara á val.

**Til § 40.** Her er ásett, hvør revsingin er, um persónur ikki røkjur tær skyldur, sum henda lóg fyriskrivar. Eisini er møguleiki fyri at verða revsaður eftir aðrari lóg.

**Til § 41.** Kommunan rindar útreiðslur, ið standast av løgtingsvali og føring av vallistum, og landskassin, veitir samsýning til løgtingsvalnevndarlimir, valstýrislimir og hjálparfólk í sambandi við løgtingsval.

**Til § 42.** *Stk. 1*: Endaliga uppgerðin (fínteljingin) av valinum verður gjørd av løgtingsvalnevndunum seinast vikudagin aftaná valið. Hóskandi er tí at seta kærufreistina til tíggjunda dagin aftaná valdagin, so møguligar kærur kunnu kannast, áðrenn løgtingið skal góðkenna valbrøvini í seinasta lagi tólvta dagin aftaná valið. Eftir stýrisskipanarlógini kann løgtingið koma saman áðrenn tólvta dagin eftir valið, men mett verður, at løgtingið ikki kann góðkenna valið fyrr enn kærufreistin er úti – eftir lógini tíggjunda dagin aftaná valið.

**Til § 43.** Ongin viðmerking.

**Annika Olsen**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen